# KT-menning lærarans

**Páll Michelsen**
**Marius Kjærbæk**

# Fororð.

## Grundgeving:

Í samband telduvarðaútbúgving okkara skulu vit gera eina verkætlanaruppgávu seinna árið, og hava vit valt uppgávuheitið: ”**KT - menning lærarans”.**
Uppgávan er at kanna og gera metingar um, hvussu vit kunnu fáa lærarar at nýta kunningartøknina á skynsamasta hátt.
Nýtslan á hvørjum skúla er tengd at, hvønn útbúnað skúlin hevur, og er tað tí eisini ein treyt, at lærarar kenna og kunnu nýta øll tøkniligu amboðini á skúlanum.
Hvussu lærarar nýta kunningartøknina ávirkast av, hvønn førleika teir hava. Hartil kemur, at kunningartøknin helst við tíðini skal gerast ein natúrligur partur av okkara arbeiði í øllum lærugreinum bæði hjá lærarum og næmingum skúlans.
Sum nú er, eru tað mest næmingar í framhaldsdeildini ið fáa tilboð um telduundirvísing. Hetta er fyri tað mesta undirvísing í hvussu teldan sjálv og ymisk forrit virka.

## Høvuðsmál:

- **Kanna hvat aðrir skúlar hava gjørt, at fáa lærararnar at nýta KT sum eitt amboð í teirra dagligu undirvísing og samskifti.**

**Tekstir:**

| | |
|---|---|
| *Inngangur* | *Ein KT-ætlan fyri allan skúlan.* |
| *KT-vegleiðing* | *Leiklutur leiðslunnar.* |
| *Skúlaverkið undir broyting* | *Lærararnir skulu latast í.* |
| *KT-ætlanir(strategiir)* | *Fullfíggja dømi um KT-ætlan.* |

- **Royna í verki um vit, sum telduvørðar, kunnu veita lærarum nøktandi stuðul og vegleiðing við KT-uppgávum.**

**Uppgávur:**

*Víðkað tekstviðgerð*

| | |
|---|---|
| *Alnótin* | *Ávegisskriving 1.fl*. |
| *Forrit Lexia* | *Ávegisskriving 2.fl* |
| | *Ávegisskriving 3.fl.* |
| *Postskipan (First Class)* | *Ávegisskriving 5.fl* |

- **Royna í verki at fáa lærarar í okkara skúlum at úttala seg um, hvørji KT-mál kundu verið sett í ymiskum lærugreinum og ymiskum floksstigum.**
  *Spurnarblað til ávegisskriving*.

# Inngangur.

Størsta arbeiðspláss í landinum fólkaskúlin stendur nú á gáttini til stórbroyting. Ikki bert tí nýggj skúlalóg við nógvum broytingum er samtykt, men eins nógv tí kunningartøknin (KT) er komin fyri at vera. Hetta krevur av lærarunum eina stóra umlegging av arbeiðshættum og samskifti lærara og lærara millum eins og samskiftið millum lærara/næming og lærara/foreldur verður grundleggjandi broytt orsakað av KT.
Um livast skal upp til ynskið um at nýta KT sum amboð í øllum lærugreinum, og um næmingarnir skulu búgvast á fullgóðan hátt at taka móti teimum avbjóðingum samfelagið setur teimum, so mugu lærararnir undir at búgva seg sjálvar til hesar avbjóðing. Lærarans KT førleiki má mennast eins og arbeiðshættirnir námsfrøðiliga mugu tillagast kunningartøknini.
Stór semja tykist vera millum skúlafólk um at besti háttur at røkka hesum endamáli er at lata tey ynski lærarin hevur um at nýta KT í undirvísingini stýra tí KT-menning sum lærarin skal ígjøgnum. Lærarans evnir at nýta KT sum amboð í undirvísingini hevur nógv størri týdning í hesum høpi enn lærarans evnir annars á KT-økinum.
Neyðugt verður tí á hvørjum einstøkum skúla at gera sær nakrar tankar um hvat lærast skal og nær tað skal lærast. Síðani má hyggjast eftir hvønn førleika lærarar skúlans hava at málið kann náast. Hava lærarar skúlans ikki neyðuga førleikan at náa onkrum av KT-málum skúlans, mugu møguleikar útvegast at loysa tann trupulleikan.
Royndir vísa, at best er, um lærarin hevur møguleika fyri KT vegleiðing í einstaka skúlanum. Ein ella fleiri KT-vegleiðarar í skúlanum, sum eru fúsir at kunna, ráðgeva og stimbra lærarar og næmingar skúlans, tykist vera besti háttur at leggja tilrættis KT-menningina. Neyðugt er, at hesir KT-vegleiðarar hava førleika at stuðla bæði tøkniliga og námsfrøðiliga.
**Spurningurin er, hvussu KT-menning lærarans kann leggjast tilrættis, soleiðis at samsvar verður millum settu málini og ta veruligu gongdina.**
Lættast hevði sjálvsagt verið, bert at gjørt sum ein er vanur, við smávegis broytingum. Men tað er avgjørt ikki nóg mikið. Eftirútbúgving, sum vit vanliga kenna hana, kann av sonnum kallast váðilig, tá um KT-menningina ræður. Stórur vandi er, at tann ætlaða menningin ikki verður rokkin, hóast støðið er høgt og innihaldið breitt í útbúgvingini. Lætt er at ímynda sær, at slettis eingin broyting verður í dagligu undirvísingini.
Hetta er ein alt ov væl kendir trupulleiki, men vandin er serliga stórur, tá um KT-menningina ræður, tí hetta er ein eftirútbúgving, sum er fyri allar lærarar, og sum ikki er endalig, men heldur má sigast at vera støðug. Her kann ongantíð sigast, at nú er nóg mikið, men heldur er hetta ein áhaldandi menning, so hvørt sum tøknin broytir umstøðurnar. Trupulleikin kann kallast ”góði viljin og óvæntaða gongdin”: Tað sum vit leggja ætlanir um, og tað sum hendir í veruleikanum, kann gerast ógvuliga ymiskt, um ikki rætt verður farið fram.
At hesin trupulleiki ikki skal gerast veruleiki, er neyðugt at leggja KT-menning lærarans soleiðis til rættis, at stuðul og vegleiðing eru við hondina, tá tørvur veruliga er. Tí er serliga tørvur á áhaldandi menning, sum:

- Verður framd í tøttum samstarvi við ta dagligu námsfrøðiligu arbeiðsgongdina, sum KT-menningin veruliga skal vera partur av.
- Er fremjandi fyri KT umleggingina.
- Fremur toymis samarbeiði.

Samanfatandi kann sigast, at neyðugt er at finna gongdar leiðir, sum fremja áhaldandi KT-menning, har øll lyfta í felag og læra hvør av øðrum, og sum nøktar skúlans KT-tørv sambært settum málum.

# KT-vegleiðing.

Tørvurin á KT-hjálp er á einumhvørjum skúla tvíbýttur. Fyri tað fyrsta er tørvur á tøkniligari umsjón, sum kann syrgja fyri at skúlans KT-útbúnaður virkar, sum hann skal, og sum kann vera vegleiðari hjá lærarunum KT-tøknini viðvíkjandi. Harafturat er tørvur á námsfrøðiligari KT-vegleiðing. Tað vil siga, at vegleiða og stuðla lærarunum at nýta KT sum amboð í undirvísingini, og sum heild samskipa KT-menning skúlans.

## Tøknilig umsjón:

Umsjón við tøknini er umráðandi, men hvussu hetta skal gerast, eru ymiskar meiningar um. Higartil hevur tað verið soleiðis, at onkur tilvildarligur lærari, við eitt sindur av áhuga og hegni á tøkniliga økinum, hevur loyst trupulleikar tøknini viðvíkjandi, so hvørt hesir hava vísta seg. Men hendan leið er ikki gongd longur, tí tøkniliga menningin gongur so skjótt, at ómøguligt er at fylgja við, og samstundis hava tíð til vanligu ungdirvísingina. Í Danmark er menningin farin tann vegin, at kommunan setir ein tøkniligan leiðara, sum hevur ábyrgd av øllum tí tøkniliga í kommununi. Á kommunala ráðhúsinum hava teir so ein ambætara (servara), sum stýrir allari tøknini hjá kommununi, og har er so ein tøkningur settur í starv, sum tekur sær av hesum, saman við KT-vørðum á stovnum og skúlum, sum hoyra til kommununa.

## Námsfrøðilig KT- vegleiðing:

Avgerandi, fyri um lærarar fara at nýta KT í undirvísingini, er møguleikin fyri at fáa námsfrøðiliga KT- hjálp. Royndirnar vísa týðiliga, at ein ella fleiri KT-vegleiðarar, sum kunnu rættleiða, ráðgeva, og stimbra starvsfelagar á einstaka skúlanum, er ein serliga góður máti at leggja KT-hjálpina tilrættis.
Tað er kanska at gera í so nógv av, tá sagt verður, at hjálpin skal vera innanfyri eina armslongd, fyri at lærarar skulu taka við henni. Men niðurstøðan er, at hjálpin skal vera løtt at fáa fatur á. Um tvørleikar eru við at fáa hjálp, ella um tað gerst tíðarkrevjandi at fáa til vega upplýsingar, so fær ein ikki gjørt uppgávuna til tíðina, og so kann alt vera tað sama, og einki verður gjørt. Hetta ger seg ikki minst galdandi innan KT.
Skikkað ráðgeving og vegleiðing eru jarnbrot á einstaka skúlanum, at lyfta KT-menningina upp á hægri støði. At hetta skal lata seg gera, er tørvur á skikkaðum KT-vegleiðarum. Tá ein skipan við námsfrøðiligari KT-vegleiðing skal setast í verk, er neyðugt at taka støðu til niðanfyri standandi spurningar:
(www.poseidon.dk )

- Hvønn skal ein venda sær til við námsfrøðiligum KT- spurningum ella trupulleikum?
- Hvør skal standa fyri keypi av nýggjum forritum og annars viðgera vanligu námsfrøðiligu KT-umstøðurnar á skúlanum?
- Hvørjir persónar skulu sita í slíkum arbeiðsbólkum, og hvørjar heimildir skulu teir hava?

Øllum hesum viðvíkjandi eru nógvar ymiskar loysnir, men eitt týðiligt rák er tann vegin, at skúlarnir seta lærarar til námsfrøðiligar vegleiðarar, so skúlin eigur hesa orku sjálvur. Arbeiðið verður gjørt av lærarum, sum hava eina KT-námsfrøðiliga útbúgving, og royndir við at vegleiða arbeiðsfelagar. Nógvastaðni er tað soleiðis, at ein persónur tekur sær av hesum spurningum í samstarvi við tann lokala KT-vørðin.

**Ein annar** møguleiki er, at velja vegleiðarar fyri lærugreinaøkir, sum so t.d. kundu verið: føroyskt, rokning, nátúra/tøkni og mál. Hetta er kortini ein dýr loysn, tá tað kemur til eftirútbúgving, men fyrimunurin er, at lærarar kunnu fáa KT-námsfrøðiliga vegleiðing frá einum lærugreina-starvsfelaga.

**Ein triði** møguleiki er, at ein velur ein KT-vegleiðara til innskúlingina, ein til miðflokkarnar og ein til framhaldsdeildina. Hetta er eisini ein dýr loysn, men fyrimunirnir eru, at lærarar og næmingar kunnu fáa vegleiðing, sum er skræddaraseymað til teirra floksstig.

KT-vegleiðararnir kunnu hjálpa lærarum og næmingum við forritum og annars vegleiða og ráðgeva:

- Tvørfakligum næmingabólkum
- Læraratoymum hjá ymiskir flokkum
- Lærugreina-toymum
- Einstøkum næmingum
- Einstøkum lærarum
- Flokkum

Innihaldið kann fyri so vítt umfata alt, sum viðvíkur námsfrøðiligu nýtsluni av KT. Tað kann m.a. vera, hvørji undirvísingarlig mál ein kann røkka við at nýta KT-tilgongdir. Tað kann eisini snúgva seg um, at leggja tilrættis eina KT-tilgongd, útinna og eftirmeta.

*Talva sum vísir, hvat KT-vegleiðing kann vera:*

| Vegleiðarauppgávur | Námsfrøðilig KT-vegleiðing kann vera at: |
|---|---|
| Vegleiðing | • Ráðgeva og vegleiða starvsfeløgum, tá teir gera ársætlan og í dagligu fyrireiking teirra<br>• Luttaka í 2-lærarskipanum við KT-tilgongdum.<br>• Vera til staðar í teldustovuni og undirvísa, vegleiða, og ráðgeva næmingum har. |
| Upplýsing | • Upplýsa lærarar og leiðslu um tiltøk á KT økinum.<br>• Hjálpa til at seta orð á hvønn KT-tørv, skúlin hevur.<br>• Luttaka aktivt í endurútbúgvingini á skúlanum. |
| Leggja ætlanir | • Taka lut í formulering av KT-visiónum og ætlanum. |
| Samskipa | • Vera skúlans andlit úteftir kunningartøknini viðvíkjandi. |

# Skúlaverkið undir broyting.

Umleggingarfyrimynd.

KT-umleggingin er kanska tann største avbjóðingin skúlaverkið stendur yvirfyri. Ì Danmark er hendan umlegging komin væl í gongd, og nógvir lærarar hava longu gjørt sær tær fyrstu royndirnar við at nýta KT í undirvísingini. Tey síðstu fimm árini hevur CTU ( Center for teknologistøttet undervisning ), sum er stovnur undir danska undirvísingarmálaráðnum, stuðlað einari røð av tiltøkum, sum hava til endamáls, at menna nýtsluna av KT í skúlunum. Síðuleypandi eru so eftirmetingar og kanningar gjørdar við tí í hyggju, at lýsa hvussu hesi hava eydnast. Royndir frá hesum tiltøkum vísa, at skúlarnir í Danmark eru væl á veg við sínum KT-umleggingum, men tørvur er á skipaðum ætlanum (strategium). Royndirnar vísa eisini, at nakrir skúlar longu hava skipaðar ætlanir.
Higartil hevur KT-umleggingin fyri tað mesta snúð seg um, hvussu tað kundi gerast møguligt at útvega sær tøknina, og hvussu KT kann nýtast í undirvísingarhøpi.
Tað hevur verið tann einstaki lærarin, sum hevur drivið verkið, og ofta hevur tað verið, og er enn soleiðis, at onkur eldsál hevur átikið sær at stuðla og hjálpa, har tørvur hevur verið.
Arbeiðið við at gera skipaðar ætlanir um, hvussu KT kann nýtast sum amboð í undirvísingini, er av stórum týdningi fyri einstaka skúlan. Á hendan hátt verða tær royndir, eldsálirnar longu hava gjørt sær, varðveittar á skúlanum, og so verður ábyrgdin eisini tikin av teirra herðum, og løgd á allar lærarar skúlans.
Neyðugt er, at síggja KT sum annað og meira enn bara eitt námsfrøðiligt amboð fyri einstaka læraran. KT kann og eigur eisini at verða nýtt sum amboð til samarbeiði, boðbering, fyrireiking, samskifti o.a. Alt hetta er slíkt sum fyriferst í skúlanum hvønn dag, og sum kann gerast lættari og smidligari við at nýta KT.
Um KT eisini verður nýtt til alt tað, sum liggur uttanfyri sjálva undirvísingina, so fáa lærararnir harvið eina venjing og upplæring í at nýta tøknina, sum so í síðsta enda kemur at gagna sjálvari undirvísingina, við tað at lærararnir longu hava ognað sær ein ávísan kunnleika um, hvussu tøknin kann nýtast.
Alt avgerandi um ein KT umlegging skal eydnast er, at fáa flutt ábyrgdina, frá bert at hava áligið tí eintakað læraranum, og til at gerast ein sjálvsagdur partur av tí ábyrgd, leiðsla skúlans hevur. Hetta kann best gerast, við at leggja eina heildar-strategi á hesum øki, og harútfrá gera verkætlanir, sum samsvara hesari. Leiðslan má átaka sær, at seta hetta arbeiðið ígongd, skapa rammurnar, vísa ans fyri tiltøkum og stuðla teimum. Samstundis mugu lærararnir átaka sær ábyrgd fyri, at tann ætlan, sum verður løgd, eisini verður gjøgnumførd. Hetta eigur alt at fara fram á ein fólkaræðisligan hátt, har alt verðu gjørt við fullum samtykki frá øllum pørtum.

# KT-ætlanir.(Strategiir).

Nýtslan av KT er nógv økt seinnu árini bæði í samanseting og breidd. Hetta er galdandi bæði tá hugsað verður um nýtsluøkir og tali av fólkum sum hetta er galdandi fyri.
Í privatu vinnuni hevur hetta ført til, at KT er vorðið eitt týdningarmikið leiðslumál. KT hevur beinleiðis verið avgerandi fyri um fyritøkuni var lív lagað. Eisini í almennum fyritøkum er tað vorðið ein avgerandi treyt at arbeiðið verður lagað til teldu-tøknina. Tí eru eyguni tey seinastu árini alt meir vend móti KT-økinum, og herðsla verður nú løgd á at snikka til KT-ætlanir (strategiir).
Hetta orðið "strategi" hevur sín uppruna í hernaðarligum samanhangi. Ein preussiskur generalur( Karl von Clausewits) legði sínar hernaðarligu ætlanir á **eitt Stratetisk, eitt Taktiskt og eitt Operationelt** støði. Hesi støðir vóru úrslit av einum strangum tignarstiga og lýstu mál og arbeiðsgongd fyri tey sum vóru undir leiðslu av generalum o.ø. Slíkar hernaðarligar ætlanir vóru gjørdar á ein hátt, sum verður nevndur "top-down." Neyðugt var ikki hjá hvørjum einstøkum at vita nakað um, hví hann skuldi gera soleiðis.
Slíkar **"top-stýrdar"** verkætlanir ( strategiir) verða ikki longur nýttar í nýmótans virkjum. Etisk/politisk-mál, og tankar um betri virkisføri, hava ført við sær meira fólkaræðisligar bygnaðarbroytingar, har hugsað verður meira um hin einstaka persónin og hansara virði og áskoðan. Nógvar kanningar vísa, at neyðugt er, um virkinum skal vera lív lagað, at starvsfólkið verður tikið við uppá ráð, soleiðis, at tey kenna seg at eiga lut í teimum avgerðum, sum tiknar verða. Eina slíka kenslu av at eiga lut í og hava ávirkan á, fáa fólk bert, um ætlanir (strategiir) verða mentar í eini tilgongd, har alt starvsfólkið er við.
Hóast KT-ætlanir hava verið royndar í privatu vinnuni í nógv ár, so hava slíkar ætlanir ikki rættiliga vunnu frama í skúlaverkinum. Men nú tykist vend vera komin í, og skúlar eru eisini farnir at leggja sær KT-ætlanir (strategiir).

## Poseidon. (Dømi um KT-ætlan):

Danska kenslumálaráðið hevur latið gera eina verkætlan, sum kallast Poseidon. Í hesi ætlan er ein partur, sum greitt vísir, hvussu ætlanir(strategiir) kunnu gerast, sum hóska júst til einstaka skúlan. Poseidon verður umsitin av CTU (Center for teknologistøttet uddannelse), og er í fyrsta umfari roynd á 10 ymiskum skúlum frá fólkaskúlastigi til universitetstig yvir eitt tíðarskeið á tvey ár.
Poseidon byggir í útgangsstøði á eina GAB-sundurgreining, sum í tí stóra og heila er ein roynd at svara trimum grundleggjandi spurningum:

- Hvar standa vit í dag?
- Hvar vilja vit helst vera um 3-5 ár?
- Hvusssu koma vit hagar?

Navnið, GAB, skal minna á tað gap ella gjógv, sum er millum verandi støðu og ta ynsktu. Verkætlanin skal gera tað møguligt at koma um gjónna.
*Poseidon-ætlanin hevur trý stig/skeið(fasur):*

- **Status-skeiðið** har ein frágreiðing verður gjørd um, hvussu støðan á skúlanum er í løtuni viðvíkjandi KT.
- **Visións-skeiðið** setir framtíðarvónir og ynskir á skánna.
- **Verkætlanar-skeiðið** leggur allar hesar visiónir og øll hesi ynski í eina fasta rammu, sum ger, at náast kann á mál. Hetta merkir, at uppgávur verða gjørdar, tíðarfreistir ásettar, fólk verða sett at hava ábyrgd fyri økjum, og fíggjarligar rammur verða lagdar.

# Ein KT-ætlan fyri allan skúlan.

*Ì samband við uppgávu okkara, hava vit havt eina samrøðu við Carsten Borre Larsen telduvørð í Rugkobbelskúlanum í Aabenraa, har hann stóð fyri Poseidon – ætlanini, og segði hann nakað soleiðis um hesa ætlan:*

Rugkobbelskúlin í Aabenraa hevur tey seinastu árini verið gjøgnum eina umfatandi KT-menningarætlan.
Sum ein av 10 skúlum í Danmark, hevur hesin skúli luttikið í Undirvísingarmálaráðsins Poseidon – ætlan, sum snýr seg um KT – menning.
Frammanundan var KT – menningin ikki stýrd av nøkrum felags málum. Menningin var borin uppi av nøkrum eldhugaðum sálum, hvørs virksemi hevði eina ávísa smittandi ávirkan, men tó við avmarkandi árini á samlaða lærarahópin. Høvuðsuppgávan var tí, at fáa allar lærararnar við, soleiðis at ein felags hugburður kundi skapast um KT- menningina, sigur Carsten Borre Larsen, lærari í Rugkobbelskúlanum og leiðari fyri skúlans Poseidon-ætlan.

**Status, visiónir og handling.**
Poseidon- ætlanin er í trimum stigum/skeiðum : **eitt statusskeið, eitt visiónsskeið og eitt verkætlanarskeið.** At fáa sett hesi skeið í gongd, varð á Rugkobbelskúlanum valdur ein arbeiðsbólkur, samasettur av seks lærarum, skúlans leiðslu og ætlanarleiðaranum, sum var telduvørðurin Carsten Borre Larsen.
Við nøkrum spurnarbløðum, staðfesti hesin arbeiðsbólkur, at viljin at nýta KT í undirvísingini var stóru, bæði millum lærarar og næmingar, men kunnleikin til KT var alt ov lítil.

**Visiónsskeiðið** var tí lagt soleiðis tilrættis, at lærararnir í tveir mánaðir vóru noyddir, at gera sær nakrar royndir og hugsanir, um hvønn leiklut KT hevði í skúla og samfelagi. Millum annað varð skipað fyri net-café fyri lærararnar, allir flokkar frá 4. til 10. høvdu ”visiónstímar”, og eitt foreldra og lærarakvøld varð eisini fyriskipað, har onkur kønur á økinum varð boðin við at røða um evnið: ”KT og skúli/samfelag.”
Visiónsskeiðið endaði við einum visiónsdegi, har lærarnir við bólkaarbeiði settu orð á teirra visiónir um, hvussu KT átti at verið tikið við í undirvísingina.

**Frá visión til verðuleika.**
Nú var so komið til triðja skeið í ætlanini: **verkætlanarskeiðið**. Felags visiónirnar skuldu umsetast til málsetningar og verkevnir. Aftaná tveir mánaðir kundu arbeiðsbólkurin leggja fram eina verkætlan, sum innihelt fimm yvirordnaðir málsetningar, m.a. hesar báðar:

- Vit vilja hava ”heil børn”, har allir partar av barnsins persónsmensku eru tiknir við.
- Lærararnir skulu vera góðir til KT.- og skulu hava ein námsfrøðiligan hugburð til spurningin um nýtslu av KT í undirvísingini.

Onkur kann kanska halda hesar málsetningar vera heldur torskildir, men fyri skúlans lærarar eru hesir prógv um, at teir í felag hava sett sær nøkur nýggj mál. Og týdningarmikið er eisini at hugsa um, at KT skal takast í nýtlu við teimum treytum børnini seta, og at hvør einstakur lærari er noyddur at gera nakað sjálvur, at menna egnan førleika á KT økinum og gera nýtslu av tí í undirvísing síni, sigur Carsten Borre Larsen.
Verkætlanin inniheldur mál og mið uppstillaði sambært teimum fimm yvirordnaðu málsetningunum. M.a. er ein listi gjørdur, yvir hvønn KT førleika næmingarnir eiga at hava aftaná ymisk floksstig.
Eitt sum er týdningarmikið fyri okkum frameftir er, at fáa gjørt eina tvørfakliga ætlan, sum sigur nakað um, hvat næmingarnir skulu arbeiða við gjøgnum alla skúlagongdina. Hetta er neyðugt, at næminganna KT- læra kann gerast óheft av, hvørjar lærarar tey hava gjøgnum skúlatíð sína. Og í hesum viðfangi er avgerandi, at tryggja at ábyrgdin ikki liggur á einum ávísum lærara, men á lærartoyminum, tað vil siga, á øllum teimum føstu lærarunum hjá flokkinum, sigur Carsten Borre Larsen.

**Semja um setningin.**
Meðan Rugkobbelskúlin arbeiddi við verkætlanunum, varð skúlin knýttir til ”Sektornet.” Lærararnir royna nú at læra seg at nýta lokalnet, elektroniskan post á ”SkoleKom,” og undirvísingartilfar á netinum.
Hugaligt er at síggja, hvussu fleiri av lærarunum longu arbeiða í trá við nýggju málsetningarnar. Teir læra av hvør øðrum, og telduvørðarnir fáa túsund spurningar. Tað gongur við í so nógvari ferð, men tað ger so einki. Tað týdningarmesta er, at vit halda fast við tann setning, sum vit eru samd um, slær Carsten Borre Larsen fast.
Rugkobbelskúlin hevur heimasíðu á www.rugkobbelskolen.dk

# Leiklutur leiðslunnar.

Eyðsæð er,at ábyrgdina hevur leiðsla skúlans, hvussu kunningartøknin verður tikin í nýtlsu á skúlanum, líkamikið hvussu nógv ella lítið einstaki leiðarin veit um hvørjar møguleikar kunningartøknin gevur. Um arbeiðið at laga alla undirvísingina til teldutøknini skal eydnast, er av avgerandi týdningi, at leiðsla skúlans hevur virknan leiklut í hesum. Leiðslan hevur námsfrøðiligu ábyrgd skúlans, og er tað tí hon, sum skal taka stig til at gera KT-ætlanir. Á nógvum skúlum eru ynski um at seta KT-menningina í samband við verandi námsfrøðiligu undirvísingarætlanir á skúlanum. Og tað er júst hetta leiðslan skal tryggja. Leiðslan kann m.a. virka fyri, at fáa til vega málsetningar og eftirmetingar av tí leikluti KT skal hava í undirvísingini. Hetta kann kanska gerast í samstarvi við telduvørðin. KT-menningin verður á henda hátt ein tilgongd, sum verður stýrd av trimum høvuðspersónum: skúlans leiðsla, læraratoymi og telduvørður. ( sí talvu niðanfyri ).

| |
|---|
| Leiðsla<br>↓↑<br>Toymi← →Telduvørður. |

Í tøttum samstarvi kunnu hesir tríggir bólkar leggja arbeiðið tilrættis at gera status, visiónir, verkætlanir og eftirmetinar av KT-verkætlanum.
Viðgerðin í lærararáðnum ella læraratoymum skal til, at øll skulu hava møguleika at ávirka og eiga lut í ætlanina, og tí kenna ábyrgd fyri henni.
Tað er, sum sagt, sera umráðandi, at allir lærararnir fáa høvi at vera við í viðgerðini.
Burturúr viðgerðini kunnu eisini koma hugskot, sum: ”Í ár viðgera vit serlig tað …., og næsta ár tað …. o.s.v.” Hetta kann so vera:

- Floksstig t.d. 1.–3. flokkur ella 10. flokkur.
- Næmingaarbeiði, t.d. ávegisskriving ella heimasíður o.s.v.
- Lærugreinaøki ella evni t.d. listaverk og myndaviðgerð á teldu, ella í náttúrulærugreinum at viðgera hagtøl við teldu.

Eitt dømi um hetta er danskur skúli, sum valdi at gera nakað serligt burturúr telduviðgerð í 1.-3. flokki. Allir lærarar í hesum flokkum fingu teldu til láns eina tíð, soleiðis at teir kundu fyrireika seg heima við teldu. Teldur vórðu settar upp í floksstovunum hjá hesum flokkum, soleiðis at í mesta lagi fimm næmingar vóru um hvørja teldu. Hetta valdu tey, at royna at geva hesum næmingum eina serliga byrjan, ella sum tey søgdu: ein ”head start” ella kanska tjóv start. Hetta skuldi so komið hesum næmingum til góðar seinni.

# Lærararnir skulu latast í:

**Hugskot og visiónir.**

Hugskot og visiónir um hvussu KT verður integrerað í skúlans arbeiði koma ikki av sær sjálvum. Hetta krevur sjálvandi ein ávísan kunnleika til hvat hendan tøknin kann nýtast til, hvørjir møguleikar eru at betra um undirvísingina við at nýta KT. Sum ein danskur lærari verður endurgivin fyri at hava sagt : ”For at kunne svare på, hvad jeg kunne tænke mig – hvad der er mine visioner – skal jeg først vide, hvilke muligheder der er.”
Tí má fyrst skapast eitt gott vitanarstøði millum skúlans lærarar, áðrenn farast kann undir at formulera hugskot og visiónir. Hetta kann gerast á ymiskan hátt. Kanska kann ymiskt skrivligt tilfar fáast til vega, um hvussu onnur hava gjørt, tá tey hava fyrireikað seg til tað nýggju avbjóðingina, sum KT - menningin í veruleikanum er. Kanska kann onkur lærari við serligum áhuga á hesum øki, gera sína meting um, hvussu KT- menningin eigur at skipast. Ella onkur verður boðin at koma og halda fyrilestur um hvussu hetta hevur verið gjørt aðrastaðni.
Næmingarnir eiga eisini at verða hoyrdir í hesum máli. Kanska kunnu felags fundir fyriskipast á skúlanum har næmingarnir sleppa at úttala seg. Ella kunnu teir eisini gera verkætlanar uppgávur har teir arbeiða við KT-menning sum evni.

# Endurútbúgving lærarans.

Læraranna KT-førleiki er avgerandi fyri. hvussu KT-ætlanin í einum skúla kemur at síggja út. Førleika-støðið hevur ávirkan á, hvussu farast kann fram við KT-ætlanini. Førleikin kann vera ógvuliga ymiskur, og tí skal styrkin nýtast og veikleikar minkast.
Tá avgerð skal takast um, hvussu førleikin kann mennast, er umráðandi at hugsa ørvísi. Ikki bert hugsa um tann vanliga skeiðsformin fyri eftirútbúgving. Heldur nýta meira óformligar hættir fyri førleikamenning sum royndar og menningarvirksemi, verkætlanir, og av royndum úr dagliga arbeiðinum læra hvør av øðrum. Nógvastaðni er tað soleiðis, at onkur, sum er serliga kønur á KT-økinum, virkar sum vegleiðari og stuðul hjá hinum.
Annars eru aðrir hættir vælkendir aðrastaðni frá á arbeiðsmarknaðinum, sum t.d. at lata lærararnar fáa eina heima-teldu, og so skal lærarin afturfyri binda seg at luttaka í skeiðvirksemi, sum hevur relatión til tað, sum KT-ætlan skúlans krevur, á tí floksstigi lærarin er serliga knýttir at.

# Fullfíggjað dømi um KT-ætlan.

## Ynskir og mál fyri KT- menning skúlans 2001-2006

- **Vit ynskja "heil børn" - har øll økir**
- **av barnsins persónligheit verður ment**
- **KT skal verða ein sjálvsagdur partur av skúlans dagligdegi , bæði fyri næmingar og lærarar.**
- **Lærarar skulu verða dugnaligir nýtarar av kt – og hava ein námsfrøðiligan hugburð til at integrera kt í undirvísingina.**
- **KT- amboðini skulu verða lætt atkomilig.**
- **Vit vilja nýta kunningartøknina til at stuðla lærarasamarbeiði og foreldrasamarbeiði við skúlan.**

| **Lutmál 1.**<br>**Vit ynskja "heil børn" - har øll økir av barnsins persónligheit verður ment .** | | |
|---|---|---|
| Vit ynskja, at næmingarnir skulu læra/verða góðir til at meta um/skilja kunnandi tilfar og teir skulu eisini duga at greina tað í einum samarbeiði við onnur<br><br>KT skal vera eitt amboð til veruligt samskifti millum menniskir á líka føti við at kunne lesa, skriva og rokna. | KT- nýtslan skal vera ein partur av skúlans núverandi og framtíðar lesiætlanar arbeiði. | |

**Lutmál 2:**
**KT skal vera ein sjálvsagdur partur av skúlans dagligdegi , bæði fyri næmingar og lærarar.**

| | | |
|---|---|---|
| Allir næmingarnir skulu duga tekstviðgerð, rokniark, kunningarleiting (internet) og e-post, áðrenn teir fara út úr skúlanum.<br><br>Næminganna KT-læring skal vera óbundin av hvat fyri eitt lærarara toymi undirvísir teimum. | 1. Tað verður gjørd ein tvørfaglig ætlan fyri KT í 1 og 2 flokk, 3 til 6 flokk og 7 til 10 flokk.Læraratoymi skal í felagskapi tryggja at ætlanin verður fylgd.<br><br>1. Í KT- ætlanini skal nýtslan av internetinum og multimedia hava eina serstaka støðu.<br>2. Ætlanin skal leggja upp til at aðrar lærugreinir enn føroyskt og rokning skulu nýta KT. | • Verður gjørd av KT-vørðinum saman við einum valdum bólki seinast januar 2002. Viðgjørt í lærarararáðnum (námsfrøðiliga ráðnum)<br>• Ætlanin verður eftirmett í lærararáðnum í 2003.<br>• Eftirmett hereftir regluliga av einum valdum bólki. |
| Næmingar og lærarar skulu hava ein nátúrligan trúna við netinum. | 1. Frá 1.- 4. flokk hevur flokkurin eina E-post adressu. Allir næmingar frá 5. flokki hava sína egnu e-post adressu.<br>2. Undirvísingartilgongdir í 5.-7. verða nýttar til at gera næmingarnar kunnugar við E-post skipanina.<br>3. Næmingar nýta skúlans heimasíðu til at útgeva nýggjheitir og undirvísingartilgongdir og annað. Í 6., 7. og 8. flokki er flokkurin bundin til at lata eina undirvísingartilgingd til heimasíðuna eina ferð um ári. | • KT-vegleiðarin útflýggjar E-post adressur til teir flokkar ið gera undirvísingartilgongdir.<br>• Toymisleiðarin tekur stig til at undirvísingartilgongdir verða gjørdar har E-postur verður nýttur<br>• Arbeiði verður efturmett við at skráseta nýtsluna av E-postskipanini og undirvísingartilgongdir nar.<br>• Skúlin ger sína egnu heimasíðu seinast d.d..KT- vørður er N.N. Innihaldi fæst til vega sum úrslit av undirvísingartilgongd-um næminganna.<br>• Ein reglugerð verður gjørd fyri nýtslu av |

| | | |
|---|---|---|
| | | interneti og innanhýsisneti. Uppskot frá KT-vørðinum sum skal góðkennast av lærararáðnum. |

| **Lutmál 3: Lærarar skulu verða dugnaligir nýtarar av KT – og hava ein námsfrøðiligan hugburð til at "integrera" KT í undirvísingina.** | | |
|---|---|---|
| Allir lærarar skulu kunna nýta KT til tekstviðgerð, kunningarleiting og e-post – og nýta hetta í undirvísingini. | Áðrenn d.d. skulu allir lærarar liva upp til kravi um at vera persónligir nýtarar. | Hvussu lærararnir eru fyri verður mett einaferð um ári við einum spurnarskema, sum samstundis kann vera vegleiðandi um skeiðstørv og innihald. |
| | Skúlin metir játtanir til eftirútbúgving innan KT høgt. | Hvørt ár í september verður uppgjørt hvussu nógvir tímar eru nýttir til eftirútbúgving innan KT, sum ein prosentpartur av tí samlaðu eftirútbúgvingini. |
| | Í eini samrøðu við skúlaleiðaran/KT-vørðin verður ein KT-menningarætlan gjørd fyri tann einstaka læraran. (Í prinsippinum seinni ein ætlan fyri alla eftirútbúgvingina.) | Samtalurnar kunnu gjøgnumførast í bólkum. Samtalurnar skulu hava verið d.d..Lærarans KT-menningarætlan verður fest á blað. Ætlanin kann innihalda ynskir um skeið, undirvísingartilgongdir saman við vegleiðara v.m. Stigtakari: Ætlanarleiðarin. |
| | Lærarnir fáa eftirútbúgving á styttri kommunalum skeiðum og LMS. | Skúlin roynir at fáa ávirkan á skeiðstilboð bæði kommunal og á kvøldskúla. Ynskini koma frá KT-samtalunum og spyrjiskemanum. |
| | KT- vørðurin fyriskipar cafè-líknandi seinnapartum, har lærararnir sjálvir seta | KT- vørður/vegleiðari býður minst 6 seinnapartar, í einum skúlaári; til kunning um evnir |

| | | |
|---|---|---|
| | skránna, tosa um tørv og mál – við einum vegleiðara til staðar. | sum hava tilknýti til hesa KT-ætlan. Lærarnir fáa samsýning fyri hesa tíð. |
| | Allir lærarar fáa internetatgongd heima. | • Skúlaleiðslan kannar teir fíggjarligu møguleikarnir og teir játtanarligu.<br>• Játtast skulu tvær farteldur við modemi og internetatgongd. |
| | Tað at læra hvør av øðrum skal nýtast meira tilætlað. | • KT-vørðurin velur minst 3 evnir um árið. Eitt ígongdsetara skeið verður fyri 4-6 áhugaðum, sum síðan átaka sær at læra starvsfelagarnar hetta á ein ketubrævslíknandi hátt.<br>• Hesin hátturin verður eftirmettur aftaná eitt ár av KT-vørðinum og einum samansettum bólki av lærarum. |
| | Læraranna luttøka í fjarundirvísing, serliga viðv. pc- korti, verður stuðlað. | • Skúlin bjóðar seg til at gjalda fyri  skeið á kvøldskúla, fjar undirvísing og annað. Somuleiðis játtar skúlin at gjalda internetsambandið um lærari luttekur í fjarundirvísing. |

| **Lutmál 4:**<br>**KT- amboðini skulu vera lætt atkomilig.** | | |
|---|---|---|
| Fleiri teldur út í stovurnar og fríari atgongd til tær. Tað skal framvegis verða møguleiki at bíleggja eina teldustovu við teldum til allar næm. | Tað verða gjørd fleiri næmingaarbeiðspláss við internet atgongd.<br><br>Tað  verða gjørd fleiri arbeiðspláss har næmingarnir hava møguleika at arbeiða, tó uttan netsamband.<br><br>Í 2004 verða teldurnar í stovu 4.  útskiftar og nýttar til næmingaarbeiðsplássini.<br><br>Í árunum 2004-6 verða fleiri  teldur/farteldur keyptar.Teldurnar verða settar í eitt rúm har allir lærarar hava atgongd, og kunnu har frá eisini setast út í klassastovurnar eftir ynski. Hesar teldur skulu kunna setast til netið.<br><br>Í 2005 skulu allar stovurnar í nýggja skúla bindast samn við netið við upp til 8 stikkum í hvørji stovu.<br><br>Tær teldur ið eru | • Næmingaarbeiðspássini verða gjørd í seinasta lagi 2004. Tær gomlu teldurnar úr teldustovuni verða nýttar her.<br><br>• Teldurnar í stovu 4. verða skiftar út í 2004. Søkja kommununa um játtan.<br>• Teldur/farteldur verða keyptar í 2005 og 2006, 4 teldur um ári.<br>• KT-vørðurin ger hvørt ár í okt. Eina ætlan yvir hvat skal keypast og leggur tað fyri skúlaleiðaran.<br>• Káplingin verður í tveimum stigum. Fyrst teldustovurnar, skrivstovurnar hjá skúlastjóra, varaskúlastjóra og bókasavni. Síðan stovurnar í nýggja skúla. Fyriskipað eftir uppskoti frá KT-vørðinum í samráð við leiðsluna. Fyrsta stig 2003 og annað stig 2005.<br>• Næmingarúmi við flytiligum teldum verður uttast á miðgongini, har bókagoymslan er nú.<br><br>• Internetcaféin verður stovna í 2004 og leidd av KT-vørðinum. |

| | | |
|---|---|---|
| | afrurúrsilgdar kunnu nýtast til vanliga teksviðgerð.<br><br>Skúlin stovnar eina internetcafè eftir skúlatíð. Næmingarnir skulu hava teldukort skúlans fyri at nýta hetta tilboð. | |

| **Lutmál 5:<br>Vit vilja nýta kunningartøknina til at stuðla lærarasamarbeiði og foreldrasamarbeiði.** | | |
|---|---|---|
| Vit vilja nýta KT til at styrkja sambandið við samfelagið vit liva í, serliga við atliti til kunning foreldranna. | Skúlin ger sína egnu heimasíðu.<br><br>*www.skulin.fo/tvo*<br><br>*www.skulin.fo/vag*<br><br>Gerast í árinum 2004 | Umsitari: N.N.<br><br>Innihald:<br><br>• Grundleggjandi kunning um skúlans virksemi og ársalmanakki.<br>• Útvaldar greinar frá næmingum/ skúlablaðnum.<br>• Margmiðling av undirvísingartilgongdum<br>• Præsentation av skúlaráðnum og kunning um teirra arbeiði , so sum fundarskráðir og tíðandi avgerðir.<br>• Læraralisti við E-post adressum.<br><br>Skúlaleiðslan (og skúlaráðið) taka støðu til hvør skal gera tilfarið til heimasíðuna. Tað |

| | | |
|---|---|---|
| | | er ikki uppgávan hjá KT-vørðinum at fáa innihaldið til vega.<br>. |
| | Tað verður ein grunnur gjørdur har frymlar hjá lærarunum verða goymdir sum ein hjálp í teirra fyrisitingarliga arbeiði. | Innan d.d. hevur KT- vørðurin í samráð við skúlaleiðaran innsamlað og uppbygt eina samling av frymlum í Word, ið kunnu nýtast til foreldrafundir, foreldrasamtalur, støðumeting, uttalilsi til verkætlanaruppgávuna, árs og vikuætlanir v.m. |
| Lærarnir skulu/kunnu nýta e-post í teirra samarbeiði. | Allir lærarar hava fingið eina E-post adressu á skulin.fo – KT-depilin..<br>Allir lærarar fáa skeið í at nýta E-post. Her verður serliga dentur lagdur á teir bólkamøguleikar sum eru, t. d. almanakkin og at senda post til fleiri. | Allir lærar hava fingið E-post adressu frá KT-deplinum.<br><br>KT- vegleiðarin gevur tilboð um skeið.Lærararanna Epost-adressur eru almennar á skúlans heimasíðu, so foreldrini kunnu nýta henda samskiftishátt eisini. |
| Allir lærarar fáa tilboð um ein elektroniskan almanakka á skúlans neti. | | KT- vørðurin nýtir í 2003 ein elektroniskan almanakka ið verður atkomiligur hjá øllum lærarum á innanhýsis netinum.Royndirnar verða leypandi eftirmettar og endaliga í ???? við atliti til hvørjar broytingar skulu gerast til tað komandi skúlaárið. |
| Vit vilja uppbyggja innanhýsis neti so tað kan verða okkara felags minni -og verða okkara felags íblástur. | | Ígongdsetan: April-oktober 2002.<br>Innanhýsisneti skal vera atkomuligt fyri lærarar sum hava internetatgongd heima seinast 2004. |

| | | |
|---|---|---|
| | | Umsitari í byrjanini er N.N..<br>Á innahýsis netinum skal m. a. vera:<br>• Skrá og fundarfrágreiðing frá toymisfundum.<br>• Kunningarskriv frá leiðsluni<br>• Datagrunnur við evnum og yvirlit yvir temavikur.<br>• Viðtiknar meginreglur fyri undirvísingina og skúlaári.<br>• Startsíður hjá næmingum og slóðir t.d. slóðir ensk lærarin hevur lagt út til nýtslu í einari undirvísingartilgongd.<br><br>Tað verður játtaður peningur og tíð til KT-vørðin og til tøkni.<br>Við endan av 2005 skulu skjøl skrivaði av leiðsluni kunnu leggjast út beinleiðis.<br>Innan 2004 skulu minst 5. lærarar verða førir fyri sjálvir alt leggja síður á skúlans innahýsisnet. Tíðarhóskandi datugrunnaforrit verður keypt innan 2004. |

# KT- lesiætlan

Hugsjónin aftan fyri KT-lesiætlanina er, at KT-læring mæminganna ikki skal verða tengd at hvørjum flokki ella hvørjar lærarar næmingurin hevur.

Ætlanin við lesiætlanini er sostatt at seta ein bindandi karm fyri hvat ein skúli væntar næmingarnir skulu læra innan KT. Hesin karmur skal virka sum ein stuðul til lærararnar og læraratoymi – og samstundis virka kveikandi. Ætlanin setur út í kortið hvat skúlin *væntar* at næmingurin kann - og ikki *nær* tey einstaku evnini verða gjøgnumgingin. Tað verður soleiðis rúm fyri at tað einstaka læraratoymið nýtir KT í undirvísingini eftir næminginsins og námsfrøðiligum tørvi.

Som útgangsstøði skulu næmingarnir hava lært teir neyðugu førleikarnir við endan av 7. flokki – og skuldu tá verið til reiðar at nýta KT og arbeiða víðari við hesum, tá tað verður nýtt í framhaldsdeildini.

Í framhaldsdeildini er tað framvegis ábyrgdin hjá lærartoyminum at tryggja at KT verður nýtt í undirvísingini – og at næminganna førleiki á KT økinum økist.

**KT- lesiætlanin er sett soleiðis upp**

Fyrst verða málini útgreinaði fyri KT – læringina á teimum 7 økjunum ( førleikakrøv).

Fyri hvørt øki er hartil:

- ***Ein ítøkilig útgreinan av endamálinum*** (ein innihaldsvegleiðing). Henda ítøkiliga uppseting skal ikki fatast bindandi – men vegleiðandi. Innihaldið velur læraratoymið alt eftir teirra ráðlegging og eftir hvørjar undirvísingartilgongdir teir nýta.
- ***Ein røð av dømum um undirvísingartilgongdir*** ið hava tilknýti tilevnisøkini.Hetta er hugsað sum íblástur til læraran og skal ikki neyturviliga gerast í øllum flokkum.
- ***Ávísingar til lesna og vevstøð á netinum***, har dømir um undirvísingartilgongdir og annað viðkomandi tilfar er. Eisini kann síggjast hvat telduvørður ella telduvegleiðari kann stuðla við og bjóða. Ein møguleiki hjá lærarunum ella læraratoyminum at menna seg á økinum!

## *Endamál fyri næmingsins KT-menning*

Teldukunnleiki:

Áðrenn endan av 2. flokki skulu næmingarnir hava byrjandi kunnleika til nýtslu av telduni.

Ábyrgd: Læraratoymi í flokkinum.

Tekstviðgerð:

Innan endan av 6. flokki skulu næmingarnir hava nøktandi førleika at nýta tekstviðgerð sum eitt vanligt amboð í undirvísingini

Ábyrgd: Undirvísingin verður byrjað av føroyskt læraranum. Læraratoymið ábyrgdast framhaldandi nýtslu av tekstviðgerð.

Kunningarleiting:

Innan endan av 7. flokki skulu næmingarnir hava nøktandi førleika at leita í dátugrunnum og á altnótini.

Ábyrgd: Læraratoymi saman við bókavørðinum.

Rokniark:

Innan endan av 7. flokki skulu næmingarnir hava nøktandi kunnleika til rokniark sum eitt amboð til loysn av spurdómum og greinandi ritmyndum.

Ábyrgd: Støddfrøðilærarin

E-postur

Innan endan av 7. flokki skulu næmingarnir hava nøktandi førleika at nýta e-post sum ein samskiftishátt.

Ábyrgd: Føroyskt lærarin

Myndaviðgerð:

Innan endan av 7. flokki skulu næmingarnir hava skannað eina mynd, tikið eina mynd við einum digitalum fototóli – og nýtt eitt myndaforrit.

Ábyrgd: Læraratoymi – H&L lærararin og føroysk lærarin.

Framløða og margmiðlar:

Innan endan av 7. flokki skulu næmingarnir hava royndir at arbeiða við framløðum á elektroniskum margmiðlum- antin á telduni ella á heimasíðu flokksins ( skúlans).

Ábyrgd: Læraratoymi – serliga lærugreinir ið arbeiða við samskifti.

# *Førleikakrøv*

## Maskinkunnleiki

| | |
|---|---|
| Almen nýtsla av telduni: | • Tendra og sløkkja telduna<br>• Val av forritum til Windows<br>• Kunnleika til tastatur og mús<br>• Útskriving<br>• Heinta og goyma fílar<br>• Nýtsla av diskettum (og netiskipan)<br>• Kenna til hugtøk sum skermur, tastatur,mús, diskil, disklastøð, harðdiskur, printari |
| Dømir um undirvísingartilgongdir ella forrit: | • Skriva eina søgu við einum tekstviðgerðarforriti. Goyma tekstina og prenta hana. (2. kl.)<br>• Gera eina tekning í ein tekniforriti. Goyma og prenta hana. (1.kl.)<br>• Arbeiða við geometriskum mynstrum í ”flisekunst”. Prenta mynstrini og goyma tey til næstu ferð. (2-3. kl.)<br>• Arbeiða við ella skriva eina søgu í ” Dansk Arbejde ” (4. kl.)<br>• Síggja eina søgu í ” Den Talende Bog ” - ella sjálvi gera eina ”Talende Bog ” saman við læraranum. (2- 4. kl.)<br>• Arbeiða við forritinum 'Dig Selv' (2.kl.)<br>• Forit: Venjingarforrit, tekniforrit, Paintbrush, tekstviðgerarforrit |
| Ávísingar: | KT-vegleiðarin býður sær at luttaka í undirvísingartilgongdunum.<br>Slóðir:<br>Dig selv, dansk og matematik<br>Årstiderne ved Lidsø |

## Tekstviðgerð

| | |
|---|---|
| Mett førleikakrøv fyri at nýta tekstviðgerð. | • Byrja eina nýggja tekst<br>• Opna eina áður goymda tekst<br>• Goyma eina tekst.<br>• Goyma eina tekst á øðrum stað ella undir øðrum navni (Gem som…)<br>• Kunnleika til diskettedrev A, harddisk C og netdrev F og H.<br>• Útskriva eina tekst og velja printara<br>• Kunnleika til ”printarakø” (Ikki prenta fleiri um trupuleiki er)<br>• Skriva eina tekst – við rættari nýtslu av linjuskifti (ikki Enter eftir hvørja linju – bert eftir reglubrot)<br>• Marka partar av tekst |

| | |
|---|---|
| | • Uppseting: Val av skriftslag og stødd<br>• Uppseting: Broyta marginstødd<br>• Nýta feita skrift, skráskrift og undirstrika.<br>• Uppseting: Indrykning af første linie i et afsnit<br>• Staðseta (vinstra, høgra miðja)<br>• Nýtsla av klipp, kopiera og seta inn.<br>• Deila orð og nýta rættstavaran.<br>• Seta eina mynd inn í eina tekst.<br>• Nýta tabellir.<br>• Nýta tabulering til uppsetan av tekst. |
| Dømir um undirvísingartilgongdir ella forrit. | • Ávegis skriving.  (2.-6. fl.)<br>• Skriva eina søgu við einum tekstviðgerðar forriti. (3. fl.)<br>• Gera skúlablað. (5.-7. fl.)<br>• Gera flokksblað (4. fl.)<br>• Skrive brøv (4. kl.)<br>• Skriva eina grein – við teigum  (5.-7. fl.)<br>• Skriva eina frágreiðing um eitt evnisarbeiði t.d. Natúr og Tøkni (4.-5. fl.)<br>• Skriva yrkingar. (3.-4. fl.)<br>• Gera glaru til uppvørpu (4. kl.)<br>• Gera handrit til sjónleikir (6. kl.)<br>• Gera innbjøðing til flokksveitslur ella føðingardagar. (5.-6. fl.)<br>• Gera plakatir (4.-5. fl.)<br>• Forrrit: Ami-Pro, MS Word, MS Publisher og PhotoDraw |
| Ávísingar: | KT-vegleiðarin býður sær at luttaka í undirvísingartilgongdunum í 2. eller 3. flokkstigi – somuleiðis í større undirvísingartilgongdum í  4. eller 5. flokki.<br>Dømir frá donskum skúla:<br>Digte og edb<br>Om tekstbehandling<br>Procesorienteret skriveundervisning |

# Kunningarleiting

| | |
|---|---|
| Førleikakrøv fyru at kunna leita í datagrunnum og á internetinum. | • Einkultar og samansettar leitingar.<br>• Venja evnini at velja og avmarka<br>• Meta um kelduna<br>• Leitiamboð á internetinum<br>• Bókmerkir í browsarinum at goyma internetadressur.<br>• Útskriva greinar av netinum<br>• Goyma greinar og myndir av netinum sum fílar – til at arbeiða víðari við |

| | |
|---|---|
| | • Kopiera tekst frá netinum – at seta inn í egna tekst |
| Dømir um undirvísingartilgongdir og forrit: | • Goyma upplýsingar um næmingarnar í flokkinum 'Dig Selv' (3. kl.)<br>• Goyma og leita eftir ummælum í datagrunni 'Anmelder' (4.-5. kl.)<br>• Leita í datagrunni hjá landsbókasavninum á Internettet (5-7. kl)<br>• Leita í datagrunnum undir SkoDa: fx. Polinfo, Faktalink og Artikelbasen (6. kl)<br>• Leita eftir upplýsingum á netinum í samband við evnisarbeiðir (4.-7. kl.)<br>• Forrit: Anmelder, Mediebasen, Dig Selv, Dan Katalog, Leitiamboð á internetinum |
| Ávísingar: | Skúlabókavørðurin býður skeið í leiting á t.d. Dankatalog í 4. flokki og at nýta dátugrunnar í Skoda á 6.-7. flokksstigi.<br>Slóðir:<br>Et program set fra tre fag<br>Om Internettet - og om at finde rundt<br>Internet i folkeskolen - en håndbog for lærere<br>Informationssøgning på Internet - de tre måder |

# Rokniark

| | |
|---|---|
| Førleikakrøv til nýtslu av rokniarki. | • Kunnleika til teigar, rekkjur og kolonnur – og navngeving av teigum t. d. A6.<br>• Kunnleika til innskriving av tekst, tølum og frymlum í ein teig.<br>• Kunna uppseta lættar frymlar og nýta brygdlar.<br>• Nýta rokniarki sum roknimaskinu. Eitt tal broytist og alt rokniarki roknar umaftur.<br>• Nýta rokniarki til grafiskar myndir av tølum. |
| Dømir um undirvísngartilgongdir ella forrit. | • Nýta rokniarki tá nógv tøl skulu setast vakurt upp. (3. kl)<br>• Innskriva eina teig av tølum sum kann visast sum ein stabbamynd. (4. kl)<br>• Gera lætt rokniark sum kann nýtast at rokna út samløgu og mun. (5- 6. kl)<br>• Rokniark sum útrokna miðaltal. (5. kl)<br>• Nýta rokniark til at gera vælgrundaðar spurndómar. Við at seta ymisk tøl í ein rokniarksfrymil kunnu næmingarnir finna loysnir á spurdómum. (6 - 7. kl)<br>• Tøl frá kanningum verða sett inn í rokniark og grafiskar myndir gjørdar sum sýna lutfall og |

| | |
|---|---|
| | annað. (4. kl)<br>• Forrit: Excel, MS Works Rokniark |
| Ávísingar: | KT-vegleiðarin býður sær at luttaka í undirvísingartilgongdunum.<br><br>Slóðir:<br>Hvad koster juleaften?<br>Om regneark<br>Trafik, Kend dig selv og Frimærke<br>Hvor mange skarver er der plads til i Danmark? |

# E-postur

| | |
|---|---|
| Um at nýta e-post. | Byrjunarførleiki:<br><br>• Næmingarnir fáa sina egnu e-post adressu. 1 til 3 fl. fær flokkurin eina e-post adressu.<br>• Kunna senda, opna og útskriva ein e-post.<br>• Kunna senda ein e-post til fleiri móttakarar samstundis.<br>• Kunna lesa og skriva eitt innlegg í eini ráðstevnu<br>• Hava kunnleika til 'post-servaran' – sum millumlið millum avsendara og móttakara.<br>• Læra rættan atburð viðv. E-postnýtslu<br><br>Hægri førleikakrøv:<br><br>• Kunna viðhefta eina fílu í ein E-post<br>• Kunna opna ein viðheftan fíl<br>• Kunna svara uppá eitt E-bræv.<br>• Kunna senda eitt innkomið E-bræv víðari. |
| Dømir um undirvísingartilgongdir ella forrit: | • Samarbeiði viða aðrar føroyskar flokkar. Ikki neyturviliga á 'pennevenne-basis' - men samskifti við meiningum og vitan um okkurt ávíst evni. Undirvísingartilgongdirnar eiga at nýta teir møguleikar ið eru í tí skjótleika E-postur gevur – næstan samstundis. (4.-7. kl)<br>• Skriva eina vallara søgu, ið verður send í millum dagliga. (3.- 4. kl)<br>• Greiða frá nærumhvørvinum fyri einum øðrum flokki – møguleiki at seta spurningar (5- 6. kl)<br>• Savna eygleiðingar um veður og annað sum upptekur næmingarnar í nærumhvørvinum og senda tað til ein annan flokk.(3.-4. kl)<br>• Skriva eitt lesarabræv um eitt ávíst evni og leggja tað út á eina kjakráðstevnu. (6- 7. kl)<br>• Senda frágreiðingar heim frá einum seturskúlatúri (6.-7. kl) |

| | |
|---|---|
| | • Samskifta við ein rithøvund, ið hevur skriva eina bók næmingarnir hava lisið (6- 7. kl)<br>• Samarbeiði við ein útlendskan flokk (6.-9. kl)<br>• Forrit: Samhøll, FC Skolekom |
| Ávísingar: | Telduvegleiðarin býður sær at luttaka og vegleiða í undirvísingartilgongdum í E-posti í 4. ella 5. flokki.<br>Slóðir:<br>Om elektronisk post<br>Gode råd om elektronisk post<br>Med e-post fra land til land<br>Tag en tekst og lad den vandre<br>Påske- 5. klasse skriver med Sverige<br>Hvis jeg skulle bestemme |

## Myndaviðgerð

| | |
|---|---|
| Kunna arbeiða við myndum | • Opna eitt mynda forrit<br>• Skanna eina mynd<br>• Stilla upploysningin á skannaranum. (72 DPI um myndin skal nýtast á einum skermi - og millum 144 og 300 DPI um myndin skal prentast) – og stilla litdýbd<br>• Goyma eina mynd sum eina fíl – væl av fílslag: BMP, JPG, GIF, TIFF<br>• Broyta ljósstyrki og kontrast í einari mynd<br>• Gera eina mynd skarpari<br>• Broyta tali av litum í einari mynd<br>• Læra at minka og veksa um eina mynd<br>• Kunna opna eina mynd í einum fílslag - og goyma tað í einum øðrum. (Konvertere billedformatet) |
| Dømir um undirvísingartilgongdir ella forrit: | • Skanna eina mynd inn og seta tekst á – t.d. í samband við eitt skúlablað ella floksblað (5- 6. kl)<br>• Skanna tekningar - og seta tær í t.d. Dansk Arbejde ella Den Talende bog (3. kl ella 5. kl)<br>• Skanne eina sjálvsmynd - síðan viðgera hana listarliga – t.d. í H&L. (4. kl)<br>• Broyta myndir (spegling, blanda myndir ) - ( 6. ella 7. kl)<br>• Forrit: Paintbrush, Paint Shop Pro, Image Composer |
| Ávísingar: | KT- vørður ella vegleiðari býður sær at luttaka og vegleiða, serliga við læringini av forritinum<br>Slóðir:<br>Billedbaser - i håndarbejde Om billedbehandling |

# Framløga  og margmiðlar

<table>
<tr><td>Byrjandi royndir við framløgu á elektroniskan hátt</td><td><ul><li>Hava nýtt (ikki neyðugt at vera gjørdar av nýtara) tekstir á netinum, ella fløgu, har tekst, mynd og ljóð verður samskipað</li><li>Kunnleika til tekstir har tekst, ljóð og mynd stuðla hvørt annað</li><li>Tað verður lagdur dentur á hugskotstíðina og tað innleiðandi tilrættaleggingina</li></ul></td></tr>
<tr><td>Dømir um undirvísingartilgongdir ella forrit:</td><td><ul><li>Síggja og lesa eina talandi bók sum lærarin ella størri næmingar hava gjørt (1.-2. kl.)</li><li>Finna ”informationer” á fløgum. (3. kl. og 6. kl)</li><li>Gera tekningar sum verða skannaðar og  lagdar í eina elektroniska bók – síðan verður tekst og ljóð sett til. (4.-5. kl)</li><li>Gera eina framløgu – sum eitt slideshow – har upplestur ella ein søga fylgir við (6. kl)</li><li>Gera eina sjálvkoyrandi lýsing um okkurt tiltak á skúlanum (5.-7. kl.)</li><li>Gera flokksins heimasíðu, har næmingarnir lýsa seg sjálvar ella onkra verkætlan teir hava gjørt (6-7. kl.)</li><li>Gera einkultar síður, sum kunnu verða ein partur av heimasíðu skúlans (5.-7. kl)</li><li>Gera eitt ævintýrspæl ( 6. - 7. kl)</li><li>Forrit: Den Talende Bog, Eventyrspil, PowerPoint, Medi8tor, Frontpage 2000 og Internet Explorer</li></ul></td></tr>
<tr><td>Ávísingar:</td><td>KT-vørðurin býður sær at vegleiða og luttaka í undirvísingartilgongdum, har næmingarnir gera eina talandi bók í 5. flokki og eina heimasíðu í 6. flokki.<br><br>Slóðir:<br>Om multimediepræsentationer<br>'Du er dum, Dan' - et multimedieforløb i 5. klasse<br>På eventyr med edb i dansk og billedkunst<br>Mastrupsøerne<br>Multimediepræsentation i engelsk: Tegneserien og<br>Den Talende bog</td></tr>
</table>

## Dømir um KT- átøk í teimum ymisku flokkunum.

Tey ásettu flokstigini eru vegleiðandi. Átøkini vilja í flestu førum eisini kunnu nýtast áðrenn ella aftaná nevnda flokstig. Øll átøk skulu ikki neyðturviliga gerast í øllum flokkum.
Hetta yvirlit er við atliti til KT- menningina.Men undirvísingartilgongdirnar skulu ikki skiljast sum bert KT- mennandi, men skulu samansjóðast við evnir, tilfar og arbeiðshættir í lærugreinunum.

| flokkur | Undirvisning við KT | Øki innan KT-menning |
|---|---|---|
| **1. flokkur** | Hyggja og lesa í eini Talandi bók, sum lærarin ella størri næmingar hava gjørt | Teldukunnleiki<br>Framløga og margmiðlar |
| | Gera eina tekning í einum tekniforriti, goyma og prenta hana | Teldukunnleiki<br>Myndaviðgerð |
| | Arbeiða við ella skriva eina søgu í Dansk Arbejde | Teldukunnleiki<br>Tekstviðgerð |
| | Arbeiða við at lesa smærri søgur við ljóði á fløgu | Teldukunnleiki |
| **2. flokkur** | Skriva eina søgu inn í eitt tekstviðgerðarforrit. Goyma tekstina og prenta | Teldukunnleiki<br>Tekstviðgerð |
| | Skanna eina tekning. Arbeiða við henni í einum tekniforrit goyma og prenta | Teldukunnleiki<br>Myndaviðgerð |
| | 'Sjálvi' gera eina 'Talandi bók' saman við læraranum | Teldukunnleiki<br>Framløga og margmiðlar |
| | Arbeiða við geometriskum mynstrum í 'Flisekunst'. Prenta mynstri og goyma tað á diskettu til næstu ferð | Teldukunnleiki |
| | Arbeiða við forritinum  'Dig Selv': Sjálvsmynd | Teldukunnleiki<br>Kunningarleiting |
| **3. flokkur** | Skriva eina søgu við einum tekstviðgerðarforriti. Velja slag av skrift og skriftstødd | Teldukunnleiki<br>Tekstviðgerð |
| | Skriva yrkingar.Gera tekningar  og seta tær inn í tekstin | Tekstviðgerð<br>Myndaviðgerð |
| | Goyma upplýsingar um næmingarnar í flokkinum í  'Dig Selv' | Kunningarleiting |

| | |
|---|---|
| Skriva eina vallarasøgu, sum í eitt tíðarskeið dagliga verður send til ein annan flokk aðrastaðni í landinum | E-postur<br>Tekstviðgerð |
| Samla upplýsingar um veður og vind og goyma tað í einum rokniarki, møguliga samskifta við ein annan flokk her heima ella aðrastaðni | Rokniark<br>Kunningarleiting<br>E-postur |
| Skanna tekningar inn og seta tær inn í t.d. Dansk Arbejde ella Tann talandi bókin | Myndaviðgerð<br>Tekstviðgerð |
| Finna upplýsingar á eini fløgu | Kunningarleiting |
| Finna upplýsingar um fuglar á Internetinum (foderbrættet). Fulglamyndir verða heintaði av netinum og sett inn í viðkomandi tekst | Kunningarleiting<br>Tekstviðgerð |
| Nýta rokniark, tá tøl skulu setast vakurt á rað | Rokniark |

**4. flokkur**

| | |
|---|---|
| Skriva brøv | Tekstviðgerð |
| Gera ein glaru t.d. við einari mynd á | Tekstviðgerð<br>Myndaviðgerð |
| Tøl frá eini kanning verða sett inn í eitt rokniark – tølini verða eisini framsett grafiskt | Rokniark |
| Leita í ”Dankatalog ” | Kunningarleiting |
| Leita eftir upplýsingum á internetinum t. d. í samband við okkurt evnisarbeiði | Kunningarleiting |
| Skanna eina sjálvsmynd – og viðgera myndina- t.d. í h&l. Sjálvsmyndirnar kunnu møguliga leggjast á eina heimasíðu | Myndaviðgerð<br>Framløga og margmiðlar |

**5. flokkur**

| | |
|---|---|
| Ávegisskriving | Tekstviðgerð |
| Gera eina skrá fyri eina floksveitslu, ella eitt foreldrakvøld | Tekstviðgerð<br>Myndaviðgerð |
| Gera eitt floksblað | Tekstviðgerð |
| Goyna og leita eftir ummælum í datagrunnunum 'Anmelder' | Kunningarleiting |
| Greiða frá nærumhvørvinum, fyri einum øðrum flokki– við møguleika fyri at stilla spurningar<br><br>Samarbeiðstilgongd við annan flokk. Ikki neyðturviliga á ”pennavinsstøði” – men samskifti um vitan, kunning og meiningar um eitt ávíst evni. Tilgongdirnar skulu helst nýta E- post so skjótleikin kemur til sjóndar- næstan samstundis. | E-postur<br>Tekstviðgerð |

| | |
|---|---|
| Gera tekningar sum verða skannaðar og settar inn í eina elektroniska bók -  so næmingarnir seinni kunnu seta tekst  og ljóð | Framløga og margmiðlar Myndaviðgerð |
| Gera einføld rokniark, sum rokna samløgu, mun og annað. Rokniark sum roknar miðaltal. | Rokniark |
| Leita eftir upplýsingum á internetinum í samband við evnisarbeiðir – t.d.. i PolInfo á Internetinum - | Kunningarleiting |
| Leita á landsbókasavninum | Kunningarleiting |
| Gera eina frágreiðing (rapport) t. d. í nátúr og tøkni | Tekstviðgerð |

**6. flokkur**

| | |
|---|---|
| Skriva eina grein í teigum – undir og yvirteigar | Tekstviðgerð |
| Skriva eitt lesarabræv um eitt evni sum part av einum kjaki við aðrar flokkar | E-postur Tekstviðgerð |
| Samskifti við ein rithøvund, ið hevur skriva onkra bók næmingarnir hava lisið | Tekstviðgerð |
| Arbeiða við manipulation (spejling, retouchering, sammenklip) av myndum - í donskum ella føroyskum- í samband við myndir og lýsingar | Myndaviðgerð |
| Gera eina framløgu - sum eitt slideshow – saman við upplestri ella frágreiðing av eini søgu | Framløga og margmiðlar |
| Gera floksins egnu heimasíðu, har næmingarnir gera floksins egnuheimasíðu, har næmingarnir greiða frá sær sjálvum ella eini uppgávu teir hava gjørt í flokkinum | Framløga og margmiðlar |
| Leita eftir upplýsingum á internetinum í samband við evnisarbeiði | Kunningarleiting |
| Gera handrit til sjónleik ella ”bláu bók” (poesibøkur) | Tekstviðgerð |
| Nýta rokniark til at geva grundaði svør. Við  at innseta ymisk tøl  í eina roknifrymil kunnu næmingarnir finna loysnir | Rokniark |
| Leita í dátugrunnum sum t.d. SkoDa: t.d. Polinfo, Faktalink og Artikelbasen | Kunningarleiting |
| Samskifti við flokkar uttanlanda | E-postur |
| Gera heimasíður sum er ein partur av skúlans heimasíðu | Framløga og margmiðlar |
| Gera eina lýsing fyri eitt átak á skúlanum | Framløga og margmiðlar |
| Gera eitt ævitýr | Framløga og margmiðlar Myndaviðgerð |

Vit hava í hesum partinum av uppgávini roynt at meta um og grundgeva fyri, hvønn førleika á KT-økinum lærarar skúlans skulu hava.
Vit hava eisini víst á, hvussu lærararnir kunnu ogna sær henda førleika.
Vit eru í hesum sambandi varir við, at lærarin ikki bert skal hava neyðugan KT-førleika, men eisini námsfrøðiligi førleikin má mennast samsvarandi, fyri at kunna draga KT inn í dagligu undirvísingina.
Víst verður við dømum á, hvussu undirvísingargongdir, ið so við og við menna KT-førleika næmingana.
Í uppgávini hava vit staðfest, hvønn týdning leiðslan hevur fyri KT-menning lærarana og næmingana.

## Arbeiðsætlan.

| Verkevni: | Tíðarætlan: |
|---|---|
| • Eitt undirvísngartiltak har kt- verður nýtt. | fr. 16 - 2 - 2001 |
| • Eftirmeting av undirvísingartiltakinum. | fr. 23 - 2 - 2001 |
| • Uppskot til KT- politik skúlans | fr. 16 - 3 - 2001 |

# Keldulisti:

- **SkolenITiden** Bent B. Andersen
- **Fra kontrol til kaos** Kisten Ehrhorn og Frank Bach Jensen
- **Ringe i vandet** Frank Bach Jensen
- **IKT i folkeskolen** Allan J. Christensen, Jane Andersen og Ina A. Mance
- **Rugkobbelskolen** - poseidon projektet - http://www.rugkobbelskolen.dk

---

# Tær praktisku royndirnar vit hava gjørt við skúlarnar

Martin S Eidesgaard:
Alnótin.

| | |
|---|---|
| **Evni** | Enskt og alnótin |
| **Flokkur** | 9. |
| **Lærarar** | Martin S. Eidesgaard |
| **Lærugrein** | Enskt |
| **KT-mál** | • At nýta alnótina at leita eftir tilfari og mgl. avmarka<br>• Taka niður tilfar av alnótini, klippa, kopiera<br>• Goyma tilfar á diskli<br>• Nýta tekstviðgerðarforrit |

| | |
|---|---|
| **Verkætlan** | Við atliti at ensk lesibókini fyri 9. flokk, finna tilfar:<br>• um sama evni/tema<br>• rithøvund<br>• o.a.m. |
| **Næmingaførleiki** | Nógvir av næmingarnir eru hampuliga væl fyri í enskum, at ferðast á alnótini og eisini at brúka tekstviðgerð.<br>Í millum eru tó eisini næmingar, sum fáa sera lítið burtur úr. |
| **Lærarаførleiki** | Lærari í enskum og hampuliga góðan telduførleika |
| **Praktiskar royndir** | Undirvísing í teld, t.d. alnótini (PC-koyrikort, Modul 7) |
| **Tilrættalegging** | Fyrst av øllum vórðu næmingarnir spurdir, um teir høvdu hug at royna eina ensk/teldu-royndarverkætlan, at finna tilfar, ið hevur eitthvørt við ensku lesibókina at gera. Tað var einki problem!<br>Uppgivni teksturin er allur vøgjørdur og annars hava næmingarnir á bandi hoyrt alla bókina.<br>Næmingarnir skuldu velja sær evni, søgu, rithøvund at finna tilfar um. |
| **Undirvisningargongdin** | Í flokkinum, einsæris ella í bólkum velja sær eitthvørt evni, søgu, rithøvund e.a.<br><br>Í telduhølinum, aftur einsæris ella í bólkum leita, taka niður, kopiera, goyma, seta saman og prenta tilfar.<br><br>Næmingarnir skuldu sjálvir avgera, hvat tilfar var relevant.<br><br>Lærari alla tíðina tøkur sum vegleiðari |

| | |
|---|---|
| **Úrslit** | Prentaðar uppgávur, har mgl. tilfar, sum hevur við próvtøkutekstin at gera, verður margfaldað næmingunum |
| **Námsfrøðilig-faglig eftirmeting** | At velja evnini úr bókini gekst væl. Verri var í summum førum, tá leitast skuldi eftir ávísum evnum/tilfari, tí sjálvandi ber ikki til at finna líka nógv tilfar um alt.<br>Næmingarnir fóru sera hugaðir undir arbeiðið – eg vil siga, nógv meir, enn eg roknaði við, men nakrir teirra blivu skuffaðir, tá teir einki ella næstan einki tilfar funnu, hóast teir vóru fyrireikaðir um tað frammanundan.<br><br>Meðan arbeitt varð við uppgávuni, skuldu næmingarnir eisini fyrireika seg til verkætlanaruppgávuna. Tað gjørdi, at henda royndin at samankoyra enskt/alnót varð darvað nokk so nógv.<br><br>Vansi: Allar teldurnar ikki eins at arbeiða við (uppseting), tekniskir trupulleikar umframt, at internet-sambandið ikki altíð var líka støðugt. |
| **KT-faglig eftirmeting** | Sjá eisini punktið omanfyri.<br><br>Endamálið, at royna at finna tilfar á alnótini, vil eg siga, varð rokkið. Nakrar uppgávur komu burtur úr. |
| **Annað** | Hetta var ein spennandi royndarverkætlan. |

Aftur.

Karin Maria Thorsteinson
Postskipan

| | |
|---|---|
| **Evni** | Samskifti |
| **Flokkar** | 2.fl. |
| **Lærarar** | Karin Maria Thorsteinsson |
| **Lærugrein** | Føroyskt/heimstaðarlæru |

| | |
|---|---|
| **KT-mál** | ❑ At læra at tendra/ sløkkja eina teldu<br>❑ At skriva av stuttan tekst við tekstviðgerð<br>❑ At royna at goyma skrivaðan tekst<br>❑ At fáa eina hóming av e-post skipanini |
| **Verkætlan** | 5 mánaðar brøv til svenskan flokk |
| **Næmingaførleiki** | Øll børnini kenna bókstavirnir, hava skrivað smásøgur.<br>Nøkur høvdu leingi "spælt" við teldu.<br>Ein næm. hevði góðan førleika at handfara teldu |
| **Lærarafø rleiki** | Bert vanligar førleikar í at nýta tekstviðgerð<br>Nýtir e-post skipanina til dagligt |
| **Praktiskar royndir** | Havi havt fleiri undirvísingarsamstørv í Norðanlondum við fjarsamskifti. |

| | |
|---|---|
| **Tilrættalegging** | Longu í 1.fl. hava vit fingið brævasamband við svenskan 1.fl. úr Halmstad. Vit hava í 1.fl. samskift við 4-5 felagsbrøvum, har eg havi skrivað og umsett til danskt eftir diktat frá næm.<br>Hetta samskifti í 2.fl. skal snúgva seg um 5 mánaðarbrøv, harav skulu 3 verða felagsbrøv og 2 einstaklingabrøv.<br>Lærarnir hava avgjørt í felag, hvørji evni brøvini skulu vera um.<br>Umframt at hava sent og fingið floksmynd hevur flokkurin eisini havt vitjan av 2 svenskum starvsfelagum, ið varða av samstarvsflokkinum. Hesi hava í fl. greitt frá og víst videomyndir av nærumhvørvinum í Svøríki.<br>Vit høvdu ásett í hvørjari viku vit skuldu senda, og annars at gera vart við, um vit ikki náddu at halda tíðina.<br><br>Tíð: uml.16 t. íalt.<br>Felagsbrøvini eru ikki so tíðarkrevjandi, men kunnu avgreiðast í einum dupulttíma<br>Einstaklingabrøvini eru meiri tíðarkrevjandi og til kladduna havi eg roknað ein dupulttíma. At umseta, skriva á teldu, goyma, og senda 3.t. |
| **Undervisningargongdin** | Skipað var soleiðis: sent varð í sept. okt.,des. jan og mars<br>1.bræv: Præsentatión, allir næm. skulu skriva um seg sjálvan.<br>2.bræv: Heystbr. Um seyð,rakstur,slagt<br>3.bræv: Jólahald hjá hvørjum einstøkum<br>4.bræv: Frítíðarítriv<br>5.bræv: Føstulávintshald<br><br>Til einstaklingabrøvini varð gjørd kladda í flokkinum. Brøvini skuldu síðan umsetast til danskt og at hjálpa mær við hesum og í telduhølinum nýtti eg 7 fl.<br>Til felagsbrøvini vórðu børnini sett saman í bólkar at sjóða um, hvat skuldu við í brævið. Síðani var avgjørt í plenum, júst hvat skuldi standa( eg skrivaði niður- og umsetti) |
| **Úrslit** | So hvørt sum felagsbrøvini komu vóru tey hongd upp á veggin.<br>Einstaklingabrøvini vóru hongd á ein lágan snór undir talvuni, so hvør einstakur hevði atgongd til brøvini. |

| | |
|---|---|
| **Námsfrøðilig-faglig eftirmeting** | Tað er eitt sindur trupult at brævasamskifta, tá ið næmingarnir eru so ungir, og tá tað, ið sendast skal, skal vera á fremmandamáli. Lærarin fekk uppgávuna at umseta felagsbrøvini, áðrenn tey vóru send.Ivasamt hevði verið vorðið við næm. brøvunum um ikki 7.fl. hjálpti til at umseta kladduna + hjálpa teimum í telduhølinum.<br>Sera umráðandi var, at vit høvdu ásett vikunr. fyri sending.<br>Svenskarar høvdu nakrir tekniskir trupulleikar, soleiðis at vit viðhvørt ikki frættu til tíðina. Eina ferð sendu tey felagsbræv við faxi ístaðin<br>Børnini gleddu seg óført at fáa post og fóru spent niðan í telduhølið at móttaka. Eg bíðaði sum oftast til seinast í vikuni, soleiðis at vit ikki bookaðu okkum inn í telduhølið til fánýtis + børnini gjørdust kedd.<br>Næm. dámdu væl at fáa brøvini framborin á svenskum, so tey so hvørt lisið varð, skuldu royna at umseta/gita týdningin.<br><br>Tað er trupult at seta tíð á í einum 2.flokki, sjálvt um eg helt meg hava tikið hædd fyri hesum, vísti tað seg at vera meiri tíðarkrevjandi enn hildið.<br><br>Eisini er gott at vita hvussu skúlaárið/ tímatalvan sær út í samstarvsflokkinum. Tá ið vit sendu føstulávintsbrøvini hjá okkum, vísti tað seg, at svenskarar høvdu vetrarfrí.<br><br>Eitt væleydnað samband er m.a. treytað av at senditíðir eru fastlagdar og avtalur hildnar, so um teldusambandið ikki riggar ber til at faxa ella snail-mail. |

| | |
|---|---|
| **KT-faglig eftirmeting** | Hetta at skula bookað seg inn, í eitt ovurhonds nógv nýtt telduhølið, langa tíð frammanundan, er ein meinbogi fyri eitt brævasamband. Høgligari hevði verið, at havt eina teldu við internetsamb. Stationerað ella á rulluborði í flokkinum.<br>Harumframt var tann trupulleiki, at bert 2 lærarir á skúlanum hava atgongd til "internet-kontaktina", soleiðis at tú noyðist fyrst at fáa avtalu við teir um uppkobling<br>Annars fingu næm. innlit í e-post skipanina, men sjálvstøðugar førleikar á økinum fingu teir ikki.<br>KT-endamálið hjá mær var sera avmarkað og tí kann eg siga at teir náddu hesum. Tey lærdu at tendra/sløkkja , goyma og sóu e-post skipanina í verki. |
| **Annað** | Í hesum frymli manglar ein teigur við heitinum "fakligt endamál" |

Aftur.

Álvur Enni:
Víðkað tekstviðgerð

| | |
|---|---|
| **Evni** | Bókmentasøga |
| **Flokkar** | 8. A flokkur |
| **Lærarar** | Álvur Enni |
| **Lærugrein** | Føroyskt |
| **KT-mál** | Víðka tekstviðgerð. Næmingarnir skulu læra at arbeiða við "dokumentoversigt". Hetta er ein hent skipan, um uppgávan er skriva eftir  einum ávísum leisti. Teir læra at skriva inn í eina uppgávu, sum er uppsett soleiðïs at teigar eru at skriva í. Teir skulu hvønn dag goyma og heinta á diskli. Næmingarnir skulu eisini venja seg við at tað skrivliga eins væl kann verða á diskli, sum á pappíri. Tá teir eru lidnir kunnu teir so prenta uppgávuna út.( Serliga teir næm. Sum ikki hava teldu heima) |

| | |
|---|---|
| **Verkætlan** | Uppgávur í bókmentasøguni hjá Árna Dahl fyri 8. flokk |
| **Nømingaførleiki** | Næmingarnir hava næstan allir ein ávísan førleika innan kt. Næstan allir hava teldulæru og nakrir fáir eru sera væl fyri.Teir duga tað mest vanliga innan tekstviðgerð. |
| **Lærarafórleiki** | Bert vanligar førleikar í at nýta tekstviðgerð<br>Nýtir e-post skipanina til dagligt |
| **Praktiskar royndir** | Nýti telduna tá næmingarnir hava ávísar uppgávur sum skulu skrivast inn og tá bólkarbeiði verð gjørt, men annars ikki so nógv. |
| **Tilrættalegging** | Eg havi regluliga bókmentasøgu og valdi at fara í teldustovuna 14. dag. Tíman ímillum høvdu vit havt bókmentasøgu niðri í stovuni og so skuldi næmingarnir svara spurningum á telduni og annars royna at arbeiða sjálvstøðugt. Hetta bleiv sett til 3. mdr.t.v.s. 6 ferðir í teldustovuni. |

| | |
|---|---|
| **Undervisningargongdin** | 6 tímar í teldustovuni og 6 tímar í flokksstovuni. Næmingarnir fingu felags undirvísing í flokksstovuni og sluppu at arbeiða meira sjálvstøðugt í teldustovuni. Næmingarnir høvdu ávísan setnig at gera liðnan og so arbeiða tað tíð sum leyp av. Hvønn dag skuldi alt goymast á diskli. Eftir hetta verður hetta nýtt tá undirvísingartilfari er gjøgnumgingið og næmingarnir eru til reiðar at svara uppgávum. |
| **Úrslit** | Tá ári er liðugt eitt hefti við øllum spurningunum til bókmentasøguna hjá Árna Dahl. |

| | |
|---|---|
| **Námsfrøðilig-faglig eftirmeting** | Næmingarnir skulu her fáa gjøgnumgingi tann setning teir sambart lesiætlanini skulu læra. Næmingarnir vóru glaðir fyri at koma í teldustovuna og hetta virkaði eisini sum ein broyting frá tí dagliga og arbeiðsgongdin var góð. Næmingarnir høvdu sjálvir diskilin og ábyrgdina av at hava hann við hvørja ferð. Hetta var eingin trupuleiki og vandust teir skjótt við hesa mannagongd. Eg haldi eisini at hetta gav teimum betri førleika í at hava skil á og tað var eisini lættari atkomuligt, tað teir høvdu skriva. Eisini høvdu teir møguleika at venda aftur til spurningar og skriva meir ella rætta um tað var neyðugt. Eg havi nýtt hesar spurningar fyr, men tá havi eg prenta teir út og so hava næmingarnir fingið eitt ark við spurningum. Hetta skuldu teir so seta í eina mappu ella goyma. Tá hevði eg ikki tær royndir at teir vendu aftur til spurningar og rættaðu ella broyttu. Pappírini vóru heldur ikki altíð at finna á røttum stað.<br>Saman um tikið haldi at royndin eydnaðist væl og fagliga fingu næmingarnir tað burtur úr, sum teir skuldu. Eisini vísti tað seg at næmingar, sum ikki vanliga vóru so kringir við penninum, her komu fult á hædd við hinar heldur ”kvikari” næmingarnar. |

| | |
|---|---|
| **KT-faglig eftirmeting** | Tey kt- málini vit settu haldi eg vit rukku. At goyma og halda skil á, nýta "dokumentoversigt", eitt sindur meira av tekstviðgerð, og annars at venja ein kt- hugburð. |
| **Annað** | Teldutøk uppgáva er viðheft, ið skal nýtast við "dokumentoversigt" |

Aftur.

Súsanna Bertholsen:
Forrit Lexia

| | |
|---|---|
| **Evni** | Eg havi ikki arbeitt við einum evni, men einum ávísum forriti, sum nevnist Lexia.<br>Lexia er eitt danskt forrit, sum gevur næmingunum møguleika fyri at arbeiða við ymiskum danskt-fakligum venjingum. |
| **Flokkar** | Í flokkinum eru 13 næmingar, sum ikki hava nýtt nógva tíð í teldustovuni.<br>Næmingarnir eru fakliga væl fyri og eg gjørdi av at velja 3.b til verkætlanina, tí flokkurin er ikki so stórur og næmingarnir eru óførir at arbeiða sjálvstøðugt. |
| **Lærarar** | Eg var einasti lærari í verkætlanini. |
| **Lærugrein** | Sum áður nevnt var tað í donskum. |

| | |
|---|---|
| **KT-mál** | • At tendra og sløkkja telduna á rættan hátt<br>• Hvussu komi eg inn á tey ymisku forritini?<br>• Kunnleika til tastatur og mús<br>• Hvørjar knøttar skal eg brúka til Lexia?<br>• Kunnleika til ymisk heiti: skaermur, tastatur, mús, harddiskur<br>• At byrja og enda forrit<br>• At opna og lukka vindeygu<br>• Harumframt skulu næmingarnir læra tann bygnað, ið ofta er í forritum við at svara spurnongum og koma víðari. |
| **Verkætlan** | Danska forriti( Lexia inniheldur 40 ymiskar uppgávur. Av teimum 40 valgdi eg 11 ymiskar uppgávur, sum vit arbeiddu við í viku 7 og 8.<br>Eg gjørdi eina raðfesting av uppgávunum, soleiðis, at uppgávurnar bygdu á hvørja aðra<br><br>1. Øve med musen<br>2. Hvad er klokken<br>3. Vælg ur<br>4. Find billedet<br>5. Skriv af<br>6. Ord og billede<br>7. Nære par<br>8. Nære svar<br>9. Vent på ordet<br>10. Passe samman<br>11. Skriv af<br><br>**Eykauppgávur til teir næmingar, sum vórðu fyrst lidnir:**<br><br>1. Svar på tekst<br>2. Galgen<br>3. Kategori |

| | |
|---|---|
| **Næmingaførleiki** | Sum áður nevnt hevur 3.b ikki nýtt nógava tíð í teldustovuni. Sjálvandi hava nakrir av næmingunum hollan kunnleika til teldur og nýta telduna dagliga við hús.<br>Men mítt útgangsstøðið sum lærari var, at vit byrjaði við tí heilt grunnleggjandi, Á henda hátt varð eisini tikin hædd fyri teim næmingum, sum ongan kunnleika høvdu til teldur. |
| **Lærarafprleiki** | Sum lærari havi eg skyldi til at sammeina teldulæru og aðra undirvísing yvirhøvur. Hetta er galdandi fyri allar lærugreinir.<br>Í hesum sambandi havi eg staðið skeiðið til KT-kort fólkaskúlans og meti tí, at eg eri før fyri at fara undir at nýta kunningartøkni í undirvísingarliga virki mínum.<br>Eg havi kunnleika til tekstviðgerð, e-mail og alnótina. |
| **Praktiskar royndir** | |
| **Tilrættalegging** | Eg hevði avgjørt at nýta 2 vikur á 3 tímar. Vit arbeiddu við Lexia, tá vit høvdu danskt. |
| **Undervisningargongdin** | Eg byrjaði við at greiða flokkinum frá um Lexia, sum vit skuldu arbeiða við í teldustovuni. Tey blivu sjálvandi áhugaði og spent. Samstundis fingu ey eina undirvísingarætlan, sum eg hevði gjørt.<br>Áðrenn tey fóru í holt við Lexia, nýttu vit 1 tíma í teldustovuni, har næmingarnir fingu undirvísing í at tendra/sløkkja telduna á rættan hátt. Síðan gjøgnumgingu vit í felag tær uppgávur í Lexia, sum vóru í undirvísingarætlanini – eisini eykauppgávurnar.<br>Nú fóru næmingarnir eldhugaðir til verka!!!! |
| **Úrslit** | Tíðarætlanin hjá mær eydnaðist. Næmingarnir arbeiddu við øllim uppgávunum hesar báðar vikurnar og allir blivu lidnir. |

| | |
|---|---|
| **Námsfrøðilig-faglig eftirmeting** | **Námsfrøðilig eftirmeting:**<br><br>Næmingarnir fingu eina góða arbeiðsgongd og vóru óførir at veita hvørjum øðrum hjálp og vegleiðing.<br><br>**Faklig eftirmeting**<br>Eftir mínum tykki vóru hesar báðar vikurnar eisini lærrikar í lærugreinini, sum var danskt. Hatta er fyrsta árið, at næmingarnir hava danskt, so fakligt mátti støðið ikki vera ov høgt, tí tað hevði havt við sær, at næmingarnir høvdu mist tileggjanina.<br>Sjálvandi vóru næmingarnir, sum gjøgnumgingu uppgávurnar skjótari enn aðrir. Teir fóru so holt við eykauppgávurnar, sum vóru torførari. |
| **KT-faglig eftirmeting** | Eg meti sjálv, at tað eydnaðist okkum at røkka teim málum, sum vit høvdu sett okkum. Onkran dag høvdu vit tekniskar trupulleikar, sum vit ikki fingu loyst. Hesum trupulleikum høvdu vit onga ábyrgd av.<br>Teir fyrst dagarnir í teldustovuni vóru tað 2-3 teldur, sum ikki vóru sløktar á rættan hátt, men hetta var eingin trupulleiki teir síðsti dagarnir. |
| **Annað** | |

Aftur.

Marner Tausen.
1. flokkur ávegisskriving.

| | |
|---|---|
| **Heiti** | Næmingar framleiða egið undirvísingartilfar. |
| **Flokkur** | 1.flokkur |
| **Lærari** | **Marner** |
| **Lærugrein** | **Føroyskt** |
| **KT-mál.** | Arbeiða við teldum. Tendra telduna, finna skriviarkið, skriva eina lítla søgu, prenta hana út til allan flokkin, goyma hana í egnari mappu og síðan sløkkja telduna. |

| | |
|---|---|
| **Verkætlanin** | Næmingarnir finna fram til onkra stutta fitta søgu um tey sjálvi. Foreldrini skulu kanska hjálpa teimum. Hava tey soleiðis ikki funnið eina egnaða søgu, hjálpir lærarin næminginum. 10 næmingar eru í flokkinum, og tey skriva eina søgu um dagin, soleiðis at ein ”runda” tekur tvær vikur.<br>Søgan verður skrivað við LTG háttinum sum fyrimynd, og teldan verður brúkt sum amboð. Næmingarnir skulu fyrst læra at tendra og sløkkja telduna. Síðan læra tey at finna fram til word-skriviarkið, lærarin og hinir næmingarnir hjálpa til meðan næmingurin skrivar sína søgu inn á telduna. Ovast á skriviarkinum hjá øllum stendur: tíðindi – 1. flokkur. Síðan kemur søgan, og hon verður skrivað í stødd 200.<br>Ætlanin er eisini, at næmingarnir skulu læra at brúka umvegir sum CTRL Z (angra) og CTRL P (prenta). |
| **Næmingaførleiki** | Næmingarnir eru úr 1.flokki, so tað er avmarkað, hvussu nógv tey klára at skriva sjálvi. Men fleiri teirra duga longu eitt sindur við telduni, tí tríggjar teldur standa í flokshølinum, og tí sita onkrir næmingar og spæla telduspøl, tá tíð er til tess. |
| **Læraraførleiki** | Lærarin hevur góðan hug at nýta teldu, sum amboð í undirvísingini. Hann hevur ikki havt møguleika at útbúgva seg til hetta, men hugurin hevur fingið hann, at seta seg inn í tað vanliga brúkið í teksviðgerð. Meginparturin av tí, lærarin dugir, er sjálvlært, men ein fortreyt fyri tí sjálvlærda er vegleiðandi og inspirerandi prát við starvsfelagar um teldur sum heild og um teldutøkni í skúlanum |
| **Praktiskar fortreytir** | Skúlin er vælútgjørdur við øllum tekniskum hentleikum. Nýggjari teldustovu við 23 teldum og uppvørpu. 1. flokkur hevur tó enn ikki verið í teldustovuni og ætlanir eru heldur ikki um at teir skulu brúka teldustovuna í 1. flokki.<br>Hinvegin standa 3 gamlar teldur í flokshølinum. Frægasta teldan er ein 50 mgh. Hetta er fyri sovítt í lagi, ikki minst tí at ein printari er knýttur til hesa telduna. Printarin hevur víst seg at vera eitt hent amboð sum bæði næmingar og lærari hava havt nógv gleði av. Hann var eisini ein fortreyt fyri, at vit kundu fremja hesa verkætlanina. |
| **Tilrættalegging.** | Lærarin skrivar: tíðindi 1. flokkur á skriviark, sum verður goymt og tikið fram at skriva á.... Teldan og printarin skulu vera ílagi. Foreldrini skulu vera kunnaði um ætlanina (í stuttum skrivi). Lærarin syrgir eisini fyri, at næmingurin hevur fingið mappu at goyma tilfarið – søgurnar – í. |

| | |
|---|---|
| **Tilgongd.** | Søgan verður skrivað og prentað í byrjanini av hvørjum tíma. Meðan hon verður prentað, gera næmingarnir okkurt annað. Ì seinnu helvt av tímanum býtir næmingurin sína søgu út. Hann verður síðan biðin um at fyrireika seg heima, soleiðis at søgan kann vera lisin fyri hinum næmingunum í byrjanini av næsta tíma.<br>Av tí, at øll hava fingið hvørt sítt eintak av søguni, kunnu tey fylgja við, tá næmingurin lesur upp fyri hinum. Eitt eintak av søguni verður síðan hongt upp á talvu á vegginum (veggja-avís). |
| **Úrslit.** | Øll hava fingið eina mappu at goyma søgurnar í. Mappan verður tikin fram av og á og brúkt at lesa upp úr, og møguliga til innantannalesing hjá nøkrum. |
| **Námsfrøðilig – eftirmeting.** | Væleydna tiltak (verkætlan ?) sum næmingarnir hava lært av. Tey lærdu tað, eg ætlaði, og tey fingu gott undirvísingartilfar at lesa burturúr. Tey eru glað fyri ”lesibókina”, tí tey hava sjálvi verið við til at gjørt hana. |
| **KT – eftirmeting.** | Eisini her lærdu tey tað eg ætlaði. Av tí at teldurnar eru nakað gamlar, er eitt sindur trupult at finna og at goyma rokniarkið. Tey høvdu eitt sindur av trupulliekum í fyrstuni av at trýsta í tveir tastir í senn (CTRL P), men tey vandust tó skjótt til hetta. Tey brúka nakað av tíð til spøl, sum vit hava funnið á netinum á heimasíðuni hjá ”Gamle spil.dk”. |
| **Annað.** | Hesuferð varð alt tilfarið savnað í eina mappu. Eina aðru ferð fara vit møguliga at gera meira burturúr innbinding og layout. |
| **Hvussu var tað at arbeiða saman við einum telduvørði.** | Okkara skúli hevur havt eina skipan við einum telduvørði, sum hevur havt høvuðsábyrgd av teldum og teldufrálæruni á skúlanum. Hetta er eftir mínum tykki ein góð skipan. Telduvørðurin gongur fremst í menningini av teldutøkni innan skúlagátt. Hann hevur skipað fyri, at teldurnar eru har tær skulu vera, - og ikki minst, at tær rigga. Tað er mennandi og motiverandi hjá flestu lærarum, at ein er, sum gongur undan, motiverar og fær hesa – fyri nógv av okkum –so ókendu tøknina at rigga.. Soleiðis hevur tað eisini verið á okkara skúla. |

Aftur.

Sylvia Poulsen.
2.flokkur ávegisskriving

| | |
|---|---|
| **Heiti.** | **Ávegisskriving við teldu** |
| **Flokkur.** | 2.flokkur |
| **Lærari.** | **Sylvia** |
| **Lærugrein.** | **Fø** |
| **KT-mál.** | Næmingar gerast meiri sjálvstøðug við teldu:<br>• Læra at finna egnar mappur<br>• Læra at skriva á teldu<br>• Læra at rætta<br>• O.s.v. |
| **Verkætlanin.** | Vit fara at royna at nýta ávegisskriving, sum næmingarnir kenna til,eisini á teldu.<br>Tey fáa høvi til at hava hugarok.<br>Skulu gera eina mynd, sum skal skannast inn.<br>Síðani skal næm.skr.eina søgu um myndina. |
| **Næmingaførleiki.** | Í Flokkinum ganga 21 næm., 13 gentur og 8 dreingir.<br>Breiddin er stór í flokkinum,tó er eingin serundirvísingsnæm.<br>Allir næmingarnir kenna væl til hugarok . og at gera myndir og skr.søgu út frá myndini. Men tey kenna einki til teldu uttan til telduspøl. |
| **Lærarafø rleiki.** | Lærarin er eldhugaður fyri at nýta teldu sum amboð í undirvísingini, men hevur ikki havt møguleika at útbúgva seg til hetta, men hugurin hevur fingið hann, at seta seg inn í tað vanliga brúkið í teksviðgerð.<br>Annars ikki serliga kønur til myndaviðgerð og scanning, so har hevði helst verið gott við hjálp frá telduvørði ella øðrum. |

| | |
|---|---|
| **Praktiskar fortreytir.** | Skúlin er vælútgjørdur við øllum tekniskum hentleikum. Nýggjari teldustovu við 23 teldum og uppvørpu. Digitalt myndatól og scannari er á skúlanum, men har er kanska ein trupulleiki, at scannarin stendur á skrivstovuni hjá varaskúlastjóranum, men við vælvild frá honum, skuldi hetta nokk gingið. |
| **Planlægning** | Í flokkinum tosa vit um at fara at arb. við teldu.<br>Hvat vit lundu hugsa okkum at gjørtí hesum sambandi Avgjørt verður at nemingarnir skulu sleppa at skr.um okkurt tey kenna.Fyri at tað skal blíva so fjøllbroytt sum gjørligt,fara vit at hava aeitt hugarok.Tey velja sær evnið og gera eina mynd út frá, og at skr.um. |
| **Tilrættalegging.** | • Hugarok<br>• Næm.gera eina mynd<br>• Skr.søgu<br>• Lærarin rættar –leystliga, og tosar við næm.hvussu man eisini kann skr.<br>• Lærarin skannar myndir inn, og ger mappur til næm.<br>• Næm.læra at finna sína mappu á telduni<br>• Skr.og goymir. |
| **Úrslit.** | Lesibók til okkara flokk. |
| **KT-eftirmeting.** | Vit settu okkum mál at læra at finna egnar mappur, tað gekk væl, men tað at skr.og rætta var verri at finna útav, at goyma var heldur ikki nakar trupulleiki, har var bert ein funktión at minnast til. |

| | |
|---|---|
| **Annað.** | Hetta arb.hevur verið merkt av at næm. hava verið nógv sjúkir, tað hevur ført við sær at lærarin má fortelja umaftur og umaftur, hvussu man finnur sína mappu, hvussu man skr.í á o.s.v. |
| **Hvussu var tað at arbeiða saman við einum telduvørði.** | Tað er av stórum týdningi at hava onkran at fáa ráð frá, og sum man veit er til tað sama.So tú ikki følir at tú troyttar onkran sum hevur størri kunnleika enn tú sjálv á hesum økinum. |

Aftur.

Sigmundur Olsen.
3. flokkur ávegisskriving.

| | |
|---|---|
| **Heiti.** | **Ávegisskriving** |
| **Flokkur.** | 3.flokkur |
| **Lærari** | **Sigmundur** |
| **Lærugrein.** | **Føroyskt** |
| **KT-mál.** | Læra at upprætta egna mappu og goyma ein tekst, skrivaður í Word, saman við innsettari mynd, ið tey sjálvi hava teknað |
| **Verkætlanin.** | Næmingarnir fáa eitt A 4 ark, har tey skulu tekna eina mynd. Tey fáa at vita, at tey skulu skriva okkurt um myndina tey hava teknað. Myndin verður síðan skannað inn og goymd í felags mappu |
| **Næmingaførleiki.** | Næmingarnir eru úr 3.flokki, so tað er avmarkað hvussu nógv tey sjálvi klára at skriva. Men tey skulu siga hvat myndin snýr seg um, og so hjálpir lærarin at seta orð teirra í ein tekst. Dentur verður ikki lagdur á stavseting, men lærarin hjálpir til so at teksturin kann lesast. |

| | |
|---|---|
| **Læraraførleiki.** | Lærarin er eldhugaður fyri at nýta teldu sum amboð í undirvísingini, men hevur ikki havt møguleika at útbúgva seg til hetta, men hugurin hevur fingið hann, at seta seg inn í tað vanliga brúkið í teksviðgerð.<br>Annars ikki serliga kønur til myndaviðgerð og scanning, so har hevði helst verið gott við hjálp frá telduvørði ella øðrum. |
| **Praktiskar fortreytir.** | Skúlin er vælútgjørdur við øllum tekniskum hentleikum. Nýggjari teldustovu við 23 teldum og uppvørpu. Digitalt myndatól og scannari er á skúlanum, men har er kanska ein trupulleiki, at scannarin stendur á skrivstovuni hjá varðastjóranum, men við vælvild frá honum, skuldi hetta nokk gingið. |
| **Tilrættalegging.** | Í flokkinum verður tosað um hvat ætlanin er. Næmingarnir fáa at vita, at teir skulu tekna eina mynd, og síðan skriva ein tekst til. Teksturin skal sjálvandi siga nakað um myndina. Tey skriva um okkurt tey kenna, og velja sjálvi evnið. |
| **Tilgongd.** | **Fyrireiking**<br>Næm. tekna mynd<br>Næm. skriva tekst á annað pappír<br>Lær. skannar mynd, og goymir í serligari mappu, ætlað til flokkin<br>Næm. læra at finna egna mynd í mappu<br>Næm. innseta mynd, skriva og goyma |
| **Úrslit.** | Mynd við tilhoyrandi teksti fyri hvønn næming, ið síðan verða hongd upp í flokkinum |
| **Námsfrøðilig – eftirmeting.** | Teimum dáma væl at tekna mynd og skriva. Áhugavert er at siggja egna mynd á skíggja, og síðan skriva egnan tekst til. Ávísir trupulleikar standast av, at telduførleikin hjá nøkrum er so lítil, og at tey hava ilt við at nýta knappaborði. |
| **KT – eftirmeting.** | Vit settu okkum sum mál at læra og finna egnar mappur, og at goyma. Hesin parturin gekk væl. Verri gekst at skriva og rætta hjá einum parti av næm. tí førleikin er avmarkaður. |

| | |
|---|---|
| **Annað.** | Ein vansi er, at ikki ber til at vísa knappaborði á stórskíggja. Fleiri hava trupuleikar við knappaborðinum. Nógv tíð gongur við at ganga frá næm. til næm. og vísa ymisku funktiónirnar. |
| **Hvussu var tað at arbeiða saman við einum telduvørði.** | |

[Aftur.](#)

Connie Gunnarstein.
5. flokkur ávegisskriving.

| **Heiti** | **Bóklingur** |
|---|---|
| **Flokkur** | 5.flokkur |
| **Lærari** | **Connie** |
| **Lærugrein** | **Danskt** |
| **KT-mál.** | • Læra at nýta digital-myndatól.<br>• Læra at gera egnu mappu<br>• Læra at velja stødd og slag av teksti.<br>• Læra at nýta rættlesara.<br>• Læra at goyma og prenta. |
| **Verkætlanin** | Ætlanin er at gera ein bókling, sum vit skulu senda til Grønlands og Danmarkar til ávikavist 2. og 5. flokk, sum vit skriva saman við.<br>Vit vilja lýsa okkara bygd við myndum og teksti. |
| **Næmingaførleiki** | Í flokkinum eru 17 næmingar.<br>Áðrenn vit fóru í teldustovuna, hevði eg onga hóming av, hvat tey dugdu, men tey søgdu øll, at teldan var eingin trupulleiki, og hugagóð var eg. |
| **Læraraførleiki** | Førleikin á KT-økinum er enn á byrjunarstøði. Hugurin at nýta telduna, sum amboð í undirvísingini er til staðar. Trupulleikin er tó at finna tíð at sita við telduna og venja allar hesar óføri møguleikar, sum teldan hevur. |
| **Praktiskar fortreytir** | Vit hava eina vælútgjørda teldustovu, sum til ber at nýta í undirvísingarhøpi. Ein skal bert skriva seg á vikutímatalvuna, so vit lærarar vita hvør av øðrum. |
| **Tilrættalegging.** | Prát í flokkinum um hvørjum vit skulu taka myndir av. Vit skriva niður hvat vit semjast um og avgera at nýta ítróttartímarnar til myndatøkur. |

| | |
|---|---|
| **Tilgongd.** | • Prát í flokkinm<br>• Myndatøkur<br>• Næmingarnir skriva tekst til myndirnar<br>• Lærarin rættar og vegleiðir.<br>• Lærarin scannar myndirnar inn og ger mappur til næmingarnar.<br>• Næmingarnir læra at finna sína mappu<br>• Næmingarnir skriva og velja stødd og slag.<br>• Prenta svart hvítt at hava heim við<br>• Goyma. |
| **Úrslit.** | Bóklingur um heimbygdina. |
| **Námsfrøðilig – eftirmeting.** | Tað er ikki so einfalt at fara við øllum flokkinum samstundis í teldustovuna tá tú ikki hevur roynt hetta áður. Tað vísti seg skjótt, at førleikin var sera ymiskur og tí varð heldur ófriðaligt til tíðir. Knappaborðið var ein stórur trupulleiki hjá fleiri. Við hollum stuðli frá telduvørðinum komu vit á mál. |
| **KT – eftirmeting.** | Tað, íð vit settu okkum sum mál haldi eg flokkurin megnaði hampuliga væl, hóast størri parturin av næmingunum ikki hevði nakrar serligar royndir innan tekstviðgerð á teldu.<br>Tað sást beinanveg, at størri parturin av næmingunum bert høvdu nýtt telduna sum spæliamboð.<br>Tað er neyðugt at næmingarnir so týðliga sum møguligt læra at nýta knappaborðið, so teir duga tað tá teir koma í 5. flokk |
| **Annað.** | Fyri okkara viðkomandi hevði tað verið gott um vit høvdu dugað at sent teldupost. Hetta hevði gjørt samskiftið við flokkarnar vit skriva saman við skjótari og lættari. Næst á skránni verður tí at fáa lært hetta. Vónandi fái eg telduvørðin at hjálpa okkum við hesum, tí torført er at standa sjálvur við einum heilum flokki, tá ein ikki er so sikkur í tí sum undirvísast skal í. |
| **Hvussu var tað at arbeiða saman við einum telduvørði.** | Eg hevði ikki háttað mær undir hesa uppgávuna, uttan stuðul frá telduvørðinum. Samstarvið okkara millum hevur riggað stak væl. |

Aftur.

**Spurnarblað til ávegisskriving.**

| | 1.fl. Marner. | 2.fl. Sylvia. | 3.fl. Sigmundur. | 5.fl. Connie. |
|---|---|---|---|---|
| **Hevði viðfesta ætlan verið hóskandi fyri tín flokk, ella hvat kundi verið annarleiðis?** | Viðfesta ætlan er eftir mínum tykki OK fyri 1.fl. | Ætlanin kundi væl verið brúkt í 2.fl.men eg hevði viljað havt arbeitt meiri við at skriva á teldu enn nú, knappaborðið tarnar teimum,í at útfolda seg. Men um man byrjaði við tí talandi bókini, hevði tað óivað vakt áhugan.Áhugin fyri telduni er ógvuliga stórur tí høvdu tey óiva lært tað skjótt, um tey høvdu møguleikan. | Eg haldi, at henda ætlan saktans kann nýtast í einum 3. flokki. Nú skal sigast, at 3. flokkur fyrst í ár hevur roynt seg við teldu, og hósast nøkur eru teldukøn, er ein stórur partur, ið ikki hevur gjørt nakað stórvegis á hesum øki. So alt tað, ið átti at verið lært í 1. og 2. fl. munnu tey læra, fyri at klára tað ið stendur í ætlanini fyri 3. fl. Hugskotið við eini vallarasøgu er frálíkt, og kundi verið stuttligt at roynt. | Eg meti, at viðfesta ætlan er nýtilig í 5.fl. Hava tey arbeitt støðugt við teldu øll árini, haldi eg, at tey megna hetta. |
| **Høvdu tit ikki viljað úttalað stutt, hvussu tað var at arbeiða saman við einum telduvørði.** | Telduvørðurin gongur fremst í menningini av KT í skúlanum. Hann skipar fyri, at teldurnar eru har tær skulu vera, - og ikki minst, at tær rigga. Tað er mennandi og motiverandi, at ein er, sum gongur undan, motiverar og fær alt at virka. | Tað er av stórum týdningi, at hava onkran at fáa ráð frá, og sum man veit er til tað sama.So tú ikki følir, at tú troyttar onkran, sum hevur størri kunnleika enn tú sjálv á hesum økinum. | Tað er gott at hava ein telduvørð sum vegleiðara og hjálp tá á stendur. Hann er eisini góður at koma við hugskotum og uppskotum um, hvussu ein ávís uppgáva kann loysast. | Eg hevði ikki háttað mær undir hesa uppgávuna, uttan stuðul frá telduvørðinum. Samstarvið okkara millum hevur riggað stak væl.<br><br>Aftur. |

KT-mál í 1.-5. flokki.

| flokkur | Undirvisning við KT | Øki innan KT-menning |
|---|---|---|
| 1. flokkur | Hyggja og lesa í eini Talandi bók, sum lærarin ella størri næmingar hava gjørt | Teldukunnleiki Framløga og margmiðlar |
| | Gera eina tekning í einum tekniforriti, goyma og prenta hana | Teldukunnleiki Myndaviðgerð |
| 2. flokkur | Skriva eina søgu inn í eitt tekstviðgerðarforrit. Goyma tekstina og prenta | Teldukunnleiki Tekstviðgerð |
| | Skanna eina tekning. Arbeiða við henni í einum tekniforrit goyma og prenta | Teldukunnleiki Myndaviðgerð |
| | 'Sjálvi' gera eina 'Talandi bók' saman við læraranum | Teldukunnleiki Framløga og margmiðlar |
| | Arbeiða við geometriskum mynstrum í 'Flisekunst'. Prenta mynstrið og goyma tað á diskettu til næstu ferð | Teldukunnleiki |
| 3. klasse | Skriva eina søgu við einum tekstviðgerðarforriti. Velja slag av skrift og skriftstødd | Teldukunnleiki Tekstviðgerð |
| | Skriva yrkingar.Gera tekningar og seta tær inn í tekstin. | Tekstviðgerð Myndaviðgerð |
| | Skriva eina vallarasøgu, sum í eitt tíðarskeið dagliga verður send til ein annan flokk aðrastaðni í landinum | E-postur Tekstviðgerð |
| | Skanna tekningar inn og seta tær inn í t.d. Dansk Arbejde ella Tann talandi bókin | Myndaviðgerð Tekstviðgerð |
| 4. klasse | Skriva brøv | Tekstviðgerð |
| | Skanna eina sjálvsmynd – og viðgera myndina- t.d. í h&l. Sjálvsmyndirnar kunnu møguliga leggjast á eina heimasíðu | Myndaviðgerð Framløga og margmiðlar |
| 5. klasse | Ávegisskriving | Tekstviðgerð |
| | Gera eina skrá fyri eina floksveitslu, ella eitt foreldrakvøld | Tekstviðgerð Bílætaviðgerð |

| | |
|---|---|
| Gera eitt floksblað | Tekstviðgerð |
| Greiða frá nærumhvørvinum, fyri einum øðrum flokki í landinum – við møguleika fyri at stilla spurningar Samarbeiðstilgongd við annan flokk. Ikki neyðturviliga á ”pennavinsstøði” – men samskifti um vitan, kunning og meiningar um eitt ávíst evni. Tilgongdirnar skulu helst nýta E-post so skjótleikin kemur til sjóndar- næstan samstundis. | E-postur<br>Tekstviðgerð |
| Gera tekningar sum verða skannaðar og settar inn í eina elektroniska bók - so næmingarnir seinni kunnu seta tekst og ljóð | Framløga og margmiðlar<br>Bílætaviðgerð |
| Gera eina frágreiðing (rapport) t. d. í nátúr og tøkni | Tekstviðgerð |

Aftur.